# Innihald

Uppskot til samtyktar um játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2024 ........ 3

Inngangur ........ 14

Lýsing av gongdini í búskapinum ........ 15

*Ískoytið til vøksturin frá útflutningsvinnunum hækkar væntandi í 2023* ........ 18
*Gongdin á arbeiðsmarknaðinum* ........ 20
*Eftirspurningur og brúkaraprísir* ........ 22
*Gongdin í til- og fráflyting* ........ 24

*Viðskifti við útlond, handils- og gjaldsjavni* ........ *27*

*Heimsbúskapurin* ........ *28*

*Almenn fíggjarmál* ........ *30*

Fylgiskjal A: Meting av almenna íløgutørvinum næstu um 15 árini ........ 33

Løgtingið

**Tórshavn**, 31. mars 2023
Mál nr.: 23/08049

**Uppskot**

**til**

**samtyktar um játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2024**

Við hesi løgtingssamtykt tekur Løgtingið undir við, at samlaði útreiðslukarmurin á løgtingsfíggjarlógini fyri 2024 verður 7.274,5 mió. kr. Rakstrarkarmurin verður 6.578,6 mió. kr., og løgukarmurin verður 695,9 mió. kr. Samlaði inntøkukarmurin verður 7.121,2 mió. kr.

Framskrivaða úrslitið á løgtingsfíggjarlógini fyri 2024 er -153,3 mió. kr. Framskrivaðu játtanarkarmarnir fyri 2024 vísa, at neyðugt verður við átøkum á útreiðslu- og inntøkusíðu landskassans. Átøk verða gjørd fyri tilsamans um 213,5 mió. kr. Eftir átøkini verður úrslitið fyri 2024 eitt avlop á 60,2 mió. kr. Í talvuni niðanfyri eru samlaðu játtanarkarmarnir fyri 2024 býttir á greinar.

| **Játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2024** | | |
|---|---|---|
| *Mió. kr.* | **Rakstur** | **Løgur** |
| § 1 Løgtingið | 83,6 | 0,0 |
| § 2 Løgmansfyrisitingin | 45,8 | 85,0 |
| § 3 Fíggjarmál | 441,9 | 10,0 |
| § 5 Fiskivinnu- og samferðslumál | 512,6 | 348,1 |
| § 6 Uttanríkis- og vinnumál | 185,9 | 0,0 |
| § 7 Barna- og útbúgvingarmál | 1.345,1 | 118,9 |
| § 11 Heilsumál | 1.632,2 | 57,8 |
| § 12 Almanna- og mentamál | 2.217,5 | 76,2 |
| § 14 Lógarmál | 43,3 | 0,0 |
| § 18 Umhvørvismál | 70,7 | 0,0 |
| ***Útreiðslur tilsamans*** | **6.578,6** | **695,9** |
| **Útreiðslukarmur** | **7.274,5** | |
| **Inntøkukarmur § 20** | **7.121,2** | |
| **Framskrivað RLÚ-úrslit** | **-153,3** | |
| **Ávegis átøk at betra úrslitið** | **183,5** | |
| **Onnur átøk at betra úrslitið** | **30,0** | |
| **RLÚ-úrslit við átøkum** | **60,2** | |

Til tess at røkka ætlaða úrslitinum á løgtingsfíggjarlógini fyri 2024, er grundarlagið tær givnu fortreytirnar fyri framskrivingum og neyðug átøk á útreiðslu- og inntøkusíðu landskassans, soleiðis sum lýst í viðmerkingunum til uppskotið til samtyktar.

**Viðmerkingar**
Landsstýriskvinnan í fíggjarmálum leggur við hesum, vegna landsstýrið, fram uppskot til løgtingssamtyktar um játtanarkarmar fyri løgtingsfíggjarlógina í 2024.

Við játtanarkørmunum, ið sambært § 8, stk. 1 í løgtingslóg um landsins játtanarskipan skulu verða lagdir fram innan 1. apríl, ásetir Løgtingið yvirskipaða fíggjarpolitiska karmin fyri komandi árið. Játtanarkarmarnir eru avgerandi fyri, hvussu stórt fíggjarliga rásarúmið verður komandi ár.

Endamálið við framskrivaðu játtanarkørmunum fyri 2024-2028 er, at framskrivingarnar vísa mettu og framskrivaðu gongdina í útreiðslum og inntøkum landsins næstu 5 árini við galdandi lóggávu og verandi virksemisstigi.

Framskrivingar fyri 2024 til 2028 vísa, at landskassin fer at hava hall í 2024 til 2026, og sum verður vent til javnvág í 2027 og avlop í 2028. Harumframt fara óbrúktar løgujáttanir (støðlingar) fyri 300 mió. kr. at verða brúktar komandi árini. Hetta fer eisini at ávirka úrslitið.

Fyri at fáa avlop í árinum 2024 og frameftir ætlar landsstýrið at fremja átøk, sum skulu geva landskassanum vaksandi avlop. Avlopini kunnu bæði brúkast til at minka landskassaskuldina við og til at standa ímóti við, tá ið búskaparliga verri tíðir koma.

Skulu nýggjar rakstrarraðfestingar koma afturat næstu árini, verður neyðugt at hækka átøkini samsvarandi.

**Framskrivingarfortreytir**
Niðanfyri verður greitt frá fortreytunum fyri ymisku framskrivingunum.

## Framskrivingar av rakstrarútreiðslum

### Rakstrarjáttanir og lógarbundnar játtanir

***Lønarframskrivingar***
Framskrivað verður fyri kendar lønarhækkingar í 2024. Roknað verður við, at almennu lønarsáttmálarnir fara at fylgja støðinum í lønarsáttmálum á privata arbeiðsmarknaðinum, og verða hesir brúktir sum framskrivingargrundarlag. Framskrivað verður við 4,04%.

Fyri ávísar játtanir, har serstøk lønarviðurskifti gera seg galdandi, verður framskrivað fyri hesum, so sum sáttmálasett ístaðin fyri tænastumenn.

***Prísvøkstur***
Meginreglan er, at prísvøkstur ikki verður framskrivaður, men tó verður hetta gjørt fyri ávísar játtanir, har stórur prísvøkstur vanliga er.

***Javning av almannaveitingum og lestrarstuðli***

Javningin av almannaveitingum og pensjónum verður vektað helvt um helvt við lønarvøkstri og prístalsvøkstri árið undan fram til 1. oktober. Er lønarvøksturin lægri enn prístalsvøksturin, verður bert javnað við lønarvøkstrinum. Javningarprosentið verður ásett í kunngerð, men verður mett til 3,8% í 2024.

Javningin av lestrarstuðlinum fylgir prístalsvøkstrinum árið undan. Javningarprosentið verður ásett í kunngerð at galda frá 1. august. Javningarprosentið er sett til 7,7% frá 1. august 2023 og verður mett til 4% frá 1. august 2024.

***Ársins prísir 2024, men fastir (realir) prísir 2025-2028***

Sum vanligt er í játtanarkørmunum, verður framskrivað í ársins prísum í 2024, men árini 2025-2028 verður framskrivað í føstum prísum. Tað merkir, at frá 2025 til 2028 verður ongin lønar- ella prísvøkstur íroknaður.

***Bundnar raðfestingar***

Nýtt ella broytt virksemi skal meginregluliga játtast fyri fult ár, tá ið tað byrjar. Er tó talan um virksemi, sum ikki er tikið við fyri fult ár í 2023, skal hetta framskrivast til fult ár fyri 2024. Framskrivast skal á sama hátt fyri virksemi, sum broytist stigvíst í tíðarskeiðnum 2024-2028, sum til dømis nýggjar útbúgvingar ella upptøku av eykaflokkum. Øvugt skal eisini framskrivast fyri virksemi, sum ætlast at enda ella minka í vavi í tíðarskeiðnum 2024-2028.

***Fólkavøkstur og broytt fólkasamanseting***

Fólkavøkstur og broytt fólkasamanseting hava við sær, at neyðugt verður at taka hædd fyri hesum í framskrivingunum av ávísum játtanum fyri at verandi virksemisstig verður varðveitt.

***Rentustøði og oljuprísur***

Játtanarkarmarnir verða gjørdir við verandi oljuprísi, men framskrivað er við, at rentustøðið hækkar nakað afturat í 2023.

***Fólkavøkstur, broytt fólkasamanseting og aðrar virksemisbroytingar***

Í mun til galdandi lóggávu verður framskrivað fyri virksemisbroytingar vegna t.d. fólkavøkstur, broytta fólkasamanseting og metingar av útreiðslugongdini út frá kendum viðurskiftum, sum hava við sær virksemisbroytingar.

**Talva: Útvaldar játtanir við størstum rakstrarvøkstri fyri 2024-2028**

| *Mió. kr.* | **FL2023** | **JK2024** | ***2025*** | ***2026*** | ***2027*** | ***2028*** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslur, §1-§18: | | | | | | |
| Tænastumannaeftirlønir | *164,0* | *171,0* | *177,5* | *183,5* | *189,0* | *194,0* |
| Strandfaraskip landsins | *252,3* | *244,6* | *241,6* | *241,6* | *241,6* | *241,6* |
| Fólkaskúlin | *435,8* | 456,7 | 458,7 | 460,7 | 462,2 | 463,7 |
| Fróðskaparsetur Føroya | *147,3* | 158,5 | 164,4 | 167,8 | 169,9 | 169,9 |
| Lestrarstuðul | *137,5* | 141,6 | 145,6 | 146,5 | 147,0 | 147,0 |
| Heilsutrygdarveitingar | *255,1* | 276,0 | 289,8 | 304,3 | 319,5 | 335,5 |
| Landssjúkrahúsið | *914,0* | 961,3 | 976,0 | 991,1 | 1.006,6 | 1.022,4 |
| Serstakur sjúkrahúsheilivágur | *66,6* | 70,0 | 72,4 | 74,9 | 77,6 | 80,3 |
| Trivnaðartænastur | *430,1* | 460,9 | 467,9 | 474,4 | 480,8 | 487,3 |
| Arbeiðsfremjandi tiltøk | *139,5* | 149,7 | 156,8 | 163,5 | 168,9 | 174,3 |
| Fólkapensjón | *666,7* | 704,8 | 728,6 | 755,6 | 785,2 | 816,6 |
| Fyritíðarpensjón | *305,9* | 331,5 | 340,5 | 347,7 | 355,6 | 364,3 |
| **Útvaldar rakstrarútreiðslur tilsamans** | ***3.914,9*** | ***4.126,5*** | ***4.219,8*** | ***4.311,6*** | ***4.403,9*** | ***4.496,7*** |
| Lutfall (útvaldar/rakstur tilsamans) | 63% | 63% | 63% | 64% | 64% | 64% |
| **Rakstrarútreiðslur tilsamans** | ***6.173,6*** | ***6.578,6*** | ***6.682,7*** | ***6.787,0*** | ***6.892,3*** | ***6.990,3*** |

***Tænastumannaeftirlønir***

Framskrivað er við mettari árligari nettotilgongd av tænastumonnum, sum fara frá fyri aldur. Størsta tilgongdin síðstu árini hevur verið lærarar, men frá 2025 byrjar tilgongdin at minka, tí lærarar síðani 1998 ikki eru settir sum tænastumenn.

***Strandfaraskip Landsins***

Lagt er upp fyri, at oljuprísurin er á sama støði sum í 2023, umframt lønarhækkingar. Í 2024 verður Sandoyarleiðin niðurløgd í sambandi við, at Sandoyartunnilin verður tikin í nýtslu. Innroknað er, at partur av sparingini verður brúkt á farleiðini, sum stuðul til P/F Eystur- og Sandoyartunlar og til Hestleiðina.

***Fólkaskúlin***

Játtanin til fólkaskúlan er í størstan mun læraralønir. Lønarhækking er framskrivað í 2024. Framskrivað er eisini við hægri pensjónsútreiðslum, sum stava frá, at sáttmálasettir lærarar verða settir í staðin fyri tænastumenn, ið fáa sína pensjón útgoldna av játtanini til tænastumannaeftirlønir.

***Fróðskaparsetur Føroya***

Økt virksemi vegna uppraðfesting av námsfrøði, sjúkrarøktarfrøði og øðrum útbúgvingum.

***Lestrarstuðul***
Játtanin er framskrivað í sambandi við økt virksemi á Fróðskaparsetri Føroya, sum er vegna fleiri lesandi innan námsfrøði, sjúkrarøktarfrøði og aðrar útbúgvingar.

***Heilsutrygdarveitingar***
Í mun til mettu nýtsluna í 2023 er játtanin framskrivað við 6,5% í 2024 og við 5% í føstum prísum frá 2025 til 2028. Framskrivingin er vegna fólkavøkstur, broytingar í fólkasamanseting, hægri takstir o.a.

***Landssjúkrahúsið***
Framskrivingin er vegna fólkavøkstur, broytingar í fólkasamanseting, umframt at serviðgerð uttanlands er framskrivað við 5% í 2024 og við 3,5% í føstum prísum frá 2025 til 2028. Framskrivað er eisini við, at H-bygningurin verður tikin í nýtslu.

***Serstakur sjúkrahúsheilivágur***
Framskrivað er í mun til mettu nýtsluna í 2023. Framskrivað er við 5% í 2024 og við 3,5% í føstum prísum frá 2025 til 2028.

***Trivnaðartænastur***
Lønarhækking er framskrivað í 2024, umframt at framskrivað er við mettari nettotilgongd av brúkarum. Í 2024 er framskrivað við, at tríggir nýggir bústovnar verða tiknir í nýtslu. Eisini er framskrivað við, at flutt verður úr ótíðarhóskandi bústovnum.

***Arbeiðsfremjandi tiltøk***
Framskrivað er við mettari nettotilgongd av brúkarum í skipanini. Veitingarnar eru framskrivaðar við lønarhækking hjá arbeiðarafeløgunum í 2024. Framskrivað er eisini við, at kravda pensjónsgjaldið hækkar 1%-stig árliga fram til 2026, tá komið er uppá 12%.

***Fólkapensjón***
Framskrivað er við mettari nettotilgongd av pensjónistum. Framskrivað er við, at veitingarnar verða javnaðar við 3,8% í 2024.

***Fyritíðarpensjón***
Framskrivað er við mettari nettotilgongd av pensjónistum. Framskrivað er við, at veitingarnar verða javnaðar við 3,8% í 2024.

**Stuðulsjáttanir**
Sum meginregla eru stuðulsjáttanir framskrivaðar við óbroyttari upphædd uttan so, at serstøk viðurskifti eru galdandi, til dømis virksemi, ið heldur uppat, ella bindandi avtala um stuðulshækking, um tað so er eingangs ella varandi.

## Løgujáttanir

### Samtyktar løguverkætlanir

Framskrivað verður sambært ætlaðu útreiðslugongdini, soleiðis sum hon er tikin við í verklagslóg, viðmerkingunum til verklagslóg og viðmerkingunum til løgujáttanina í fíggjarlógini fyri 2023.

### Verkætlanir sambært langtíðarløguætlanini

Aðrar verkætlanir verða framskrivaðar sambært langtíðarløguætlanini, soleiðis at framskrivað verður við 691,9 mió. kr. í 2024 og føstum løgukarmi á 550 mió. kr. árini 2025 til 2028.

| **Talva: Løgukarmur fyri 2024-2028** | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| *Mió. kr.* | ***FL2023*** | **2024** | **2025** | **2026** | **2027** | **2028** |
| **Løguútreiðslur tilsamans** | ***649,9*** | **695,9** | **550,0** | **550,0** | **550,0** | **550,0** |

Stuðul til løguverkætlanir hjá kommunum verður tikin við sum løgujáttanir í løgukarminum. Somuleiðis eru í løgukarminum innroknaðar løgukendar útreiðslur, so sum partapeningur í feløgum, sum fremja størri samferðsluverkætlanir, størri KT-verkætlanir og løgustuðul til sjálvsognarstovnar.

***Tunlar Norður um Fjall***

Sambært verklagslógini kostar verkætlanin 522 mió. kr. Arbeiðið við tunnilsgerðini gongur skjótt og væl. Verkætlanin er mett at verða liðug í 2024.

***Fámjinstunnilin***

Sambært verklagslógini kostar verkætlanin 207 mió. kr. Byrjað varð í 2022 og gongur sum ætlað, verður nýggja farleiðin liðug á sumri 2024.

***Tunnil til Dals***

Arbeitt verður við at gera tunnil til Dals. Byrjað varð upp á verkætlanina á vári 2019. Arbeiðið verður mett at taka 6-7 ár, alt eftir hvussu stór játtan verður veitt til verkætlanina árliga.

***Uttari ringvegur í Tórshavn***

Sambært heimildarlóg stuðlar landið verkætlanini Uttari ringvegur í Tórshavn við í mesta lagi 110 mió. kr. Arbeiðið er byrjað og verður framt komandi árini.

***Fjøruvegurin í Runavík***

Sambært heimildarlóg stuðlar landið verkætlanini nýggjur Fjøruvegur í Runavík við í mesta lagi 55 mió. kr. Arbeiðið er byrjað og verður framt komandi árini.

***Miðnám á Kambsdali***

Sambært broytingaruppskoti til galdandi verklagslóg er kostnaðurin mettur til 94 mió.kr. Verkætlanin verður eftir ætlan liðug í 2025.

***Eftirskúlin Rásin***

Sambært uppskoti til verklagslóg er kostnaðurin av at umbyggja og útbyggja eftirskúlan Rásina 25 mió. kr. Verkætlanin verður eftir ætlan liðug í 2024.

***Húsarhaldsskúlin í Klaksvík***
Sambært heimildarlóg stuðlar landið verkætlanini at byggja nýggjan Húsarhaldsskúla í Klaksvík við í mesta lagi 37,3 mió. kr. Arbeiðið er um at byrja og verður framt komandi árini.

***Klaksvíkar sjúkrahús***
Ætlanin er at gera uppskot til verklagslóg um at um- og útbyggja starvsfólkabygningin á Klaksvíkar sjúkrahúsi.

***Bústovnar***
Landsstýrið hevur sett av 50 mió. kr. árliga til nýggjar verkætlanir frá 2024 til 2028. Farið verður undir fyrireikingarnar í 2023.

***Stórhøllin í Hoyvík***
Ætlanin er at fyrireika heimildarlóg, ið fevnir um landsins stuðul til stórhøllina. Stuðulin er 30 mió. kr. í árunum 2022 til 2025.

***Eystur- og Sandoyartunlar***
Sandoyartunnilin letur eftir ætlan upp fyri ferðslu í desembur 2023. Eftir lógini setur landið 400 mió. kr. í felagið, 50 mió. kr. árliga til 2024. Harumframt verður roknað við 30 mió. kr. í ferðsluveðhaldi í 2024. Væntandi fer ferðslan gjøgnum Eysturoyartunnilin at vaksa so líðandi, soleiðis at veðhaldið bert er effektivt í styttri áramál.

## Fyritreytir fyri inntøkujáttanum og rentum

**Rentustøði**
Fyritreytirnar fyri rentuframskrivingunum eru metta gongdin í landskassaskuldini og útlitini fyri rentugongdini. Rentuútreiðslurnar eru ein óvissa í játtanarkørmunum, tí rentustøðið kann broytast, og harvið kunnu rentuútreiðslur av landskassaskuldini eisini broytast.

**Inntøkujáttanir**
Inntøkurnar verða framroknaðar við støði í søguligum inntøkutølum og teimum fyritreytum, sum eru kendar. Fyri ávísar inntøkujáttanir verður í framrokningunum lagt upp fyri serligum viðurskiftum í einstøkum vinnugreinum.

Stórur partur av inntøkusíðuni á fíggjarlógini eru skattir og avgjøld, sum verða stýrd av búskaparligu konjunkturgongdini í samfelagnum, og sum í stóran mun fylgja vøkstrinum í BTÚ.

***Fastur (realur) inntøkuvøkstur 2025-2028***
Sum vanligt er í játtanarkørmunum verður framroknað í ársins prísum í 2024. Árini 2025-2028 eru framroknað í føstum prísum, tað merkir, at framroknað er við realum inntøkuvøkstri uttan lønar- og prísvøkstur.

**Talva: Útvaldar játtanir við størstum inntøkuvøkstri fyri 2024-2028**

| *Mió. kr.* | **FL 2023** | **JK2024** | **2025** | **2026** | **2027** | **2028** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Inntøkur, §20: | | | | | | |
| Vanligur landsskattur | *2.005,0* | 2.115,0 | 2.165,0 | 2.215,0 | 2.265,0 | 2.315,0 |
| Felagsskattur | *470,0* | 480,0 | 485,0 | 490,0 | 495,0 | 500,0 |
| Kapitalvinningsskattur | *350,0* | 350,0 | 355,0 | 360,0 | 365,0 | 370,0 |
| Meirvirðisgjald | *2.085,0* | 2.175,0 | 2.225,0 | 2.275,0 | 2.325,0 | 2.375,0 |
| Loyvisgjald á alivinnu | *270,0* | 285,0 | 300,0 | 315,0 | 330,0 | 345,0 |
| Avgjald á fiskatilfeingi | *400,0* | 400,0 | 400,0 | 400,0 | 400,0 | 400,0 |
| Útluting frá alm. partaf. og grunnum | *123,5* | 87,0 | 88,0 | 89,0 | 90,0 | 91,0 |
| Heildarveiting | *616,8* | 591,8 | 566,8 | 541,8 | 541,8 | 541,8 |
| **Útvaldar inntøkur tilsamans** | ***6.320,3*** | **6.483,8** | **6.584,8** | **6.685,8** | **6.811,8** | **6.937,8** |
| Lutfall (útvaldar/inntøkur tilsamans) | *91%* | 91% | 91% | 92% | 92% | 92% |
| **Inntøkur tilsamans** | ***6.967,3*** | **7.121,2** | **7.201,8** | **7.302,7** | **7.437,3** | **7.569,6** |

Størstu inntøkukeldurnar hjá landinum eru vanligi landsskatturin og meirvirðisgjaldið, sum tilsamans eru um 60% av samlaðu inntøkunum hjá landskassanum.

***Vanligur landsskattur***

Mett verður, at vanligi landsskatturin í 2024 hækkar 5,5% sammett við metingina í løgtingsfíggjarlógini fyri 2023. Árini 2025 til 2028 er roknað við vøkstri í føstum prísum uppá um 2,5%.

***Felagsskattur***

Roknað verður við varisligum vøkstri í felagsskattinum næstu árini.

***Kapitalvinningsskattur***

Roknað verður við varisligum vøkstri í kapitalvinningsskattinum næstu árini.

***Meirvirðisgjald***

Viðvíkjandi meirvirðisgjaldinum er roknað við vøkstri á 4,5% í 2024 sammett við metingina í løgtingsfíggjarlógini fyri 2023. Árini 2025 til 2028 er roknað við vøkstri í føstum prísum uppá um 2,5%.

***Loyvisgjald á alivinnu***

Framskrivað er eftir galdandi lóggávu. Roknað verður við, at tøkan kann hækka nakað næstu árini og sostatt eisini loyvisgjaldið á alivinnu. Roknað verður við framhaldandi góðum prísum á aldum laksi á heimsmarknaðinum.

***Avgjald á fiskatilfeingi***

Framskrivað er eftir galdandi lóggávu. Óvissa er um avgjaldið á fiskatilfeingi næstu árini, serliga um semjurnar millum strandarlondini um uppsjóvarfisk og um fiskiveiðuavtalurnar við Russland. Roknað verður við umleið somu inntøkum komandi árini.

***Útluting frá almennum feløgum og grunnum***

Onki er fráboðað um serstakt vinningsbýti frá BankNordik í 2024. Framskrivað er samsvarandi meting bankans, umframt vinningsbýti frá øðrum feløgum, herundir Føroya Tele.

# Átøk at betra úrslitið

## Ávegis átøk at betra úrslitið

Landsstýrið hevur lagt fyri Løgtingið lógaruppskot um at hækka veiðigjøld frá fiskivinnuni og loyvisgjøld frá alivinnuni, við gildiskomu frá 1. august 2023. Uppskotini, verða tey samtykt sum løgd fram, geva landskassanum eina meirinntøku á ávikavist 75 mió. kr. og 90 mió. kr. í 2023. Í 2024 eru meirinntøkurnar brutto ávikavist 100 mió. kr. og 138 mió. kr.

Landsstýrið ætlar, at kommunurnar skulu fáa ein part av hesum gjøldum, umframt at upphædd verður raðfest til gransking. Eftir at hædd eisini er tikin fyri persónsskatti, minni felagsskatti og vinningsbýtisskatti eru meirinntøkurnar netto ávikavist 78,7 mió. kr. og 104,8 mió. kr. Íalt 183,5 mió. kr. í meirinntøku í 2024.

## Onnur átøk at betra úrslitið

Fíggjarmálaráðið mælir til, at rakstrarútreiðslurnar hjá landinum hækka í mesta lagi um 4,5% árliga, sum samsvarar áleið við metta búskaparvøksturin í 2023 og frameftir.

Við hesum verður vøksturin í útreiðslunum hjá landinum ikki hægri enn samlaði væntaði búskaparvøksturin, men samstundis skal útreiðsluvøksturin hjá landinum fevna um vøksturin innan lønir, veitingar og virksemisøkingar (demografiskar broytingar og fólkavøkstur).

Tískil er neyðugt at gera átøk komandi árini til at tálma útreiðsluvøkstrinum.

Mælt verður til, at átøk verða gjørd á útreiðslu- og inntøkusíðum landskassans fyri í minsta lagi 30 mió. kr. árliga. Á útreiðslusíðu landskassans svarar tað til sløk 0,5% av rakstrarútreiðslunum.

Skulu nýggjar rakstrarraðfestingar koma afturat næstu árini, verður neyðugt at hækka átøkini samsvarandi.

**Uppskot til játtanarkarmar 2024-2028**

Uppskotið til játtanarkarmar byggir á fíggjarlógina fyri 2023, umframt politisk átøk, sum eru gjørd síðani. Í talvuni niðanfyri er uppskotið til játtanarkarmar fyri árini 2024 til 2028 útgreinað og býtt á greinar og ár.

| **Talva: Útgreinaðir játtanarkarmar fyri 2024-2028** | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| *Mió. kr.* | ***FL2023*** | **2024** | **2025** | **2026** | **2027** | **2028** |
| Rakstrarútreiðslur, §1-§18: | | | | | | |
| § 1 Løgtingið | *84,8* | 83,6 | 83,6 | 84,7 | 88,1 | 85,5 |
| § 2 Løgmansfyrisitingin | *-43,1* | 45,8 | 45,2 | 46,1 | 46,3 | 45,3 |
| § 3 Fíggjarmál | *407,9* | 441,9 | 448,4 | 454,4 | 459,9 | 467,9 |
| § 5 Fiskiv.- og samferðslumál | *510,1* | 512,6 | 512,2 | 510,2 | 510,2 | 510,2 |
| § 6 Uttanríkis- og vinnumál | *177,4* | 185,9 | 186,1 | 185,8 | 185,8 | 186,1 |
| § 7 Barna- og útbúgvingarmál | *1.288,5* | 1.345,1 | 1.359,8 | 1.367,5 | 1.372,1 | 1.374,1 |
| § 11 Heilsumál | *1.542,4* | 1.632,2 | 1.665,1 | 1.699,6 | 1.740,8 | 1.777,3 |
| § 12 Almanna- og mentamál | *2.099,3* | 2.217,5 | 2.269,2 | 2.323,9 | 2.376,2 | 2.431,0 |
| § 14 Lógarmál | *39,6* | 43,3 | 43,1 | 44,8 | 42,9 | 42,9 |
| § 18 Umhvørvismál | *66,5* | 70,5 | 70,0 | 70,0 | 70,0 | 70,0 |
| **Rakstrarútreiðslur tilsamans** | ***6.173,60*** | **6.578,6** | **6.682,7** | **6.787,0** | **6.892,3** | **6.990,3** |
| **Løguútreiðslur, §1-§18*** | ***649,9*** | **695,9** | **550,0** | **550,0** | **550,0** | **550,0** |
| **Inntøkur** | ***6.967,3*** | **7.121,2** | **7.201,8** | **7.302,7** | **7.437,3** | **7.569,6** |
| **Framskrivað RLÚ-úrslit** | ***143,8*** | **-153,3** | **-30,9** | **-34,4** | **-5,1** | **29,3** |
| **Ávegis átøk at betra úrslitið** | ***158,3*** | **183,5** | **170,6** | **170,6** | **170,6** | **170,6** |
| **Onnur átøk at betra úrslitið** | | **30,0** | **60,0** | **90,0** | **120,0** | **150,0** |
| **RLÚ-úrslit við átøkum** | ***302,1*** | **60,2** | **199,7** | **226,3** | **285,6** | **349,9** |

**Viðm:** Tølini fyri 2023 og 2024 eru í ársins prísum, og tølini fyri 2025-2028 eru í føstum prísum. Tað vil siga, at lønar- og prísvøkstur er ikki íroknaður, hvørki á útreiðslu- ella inntøkusíðu landskassans. Tølini fyri 2023 eru sambært samtyktu fíggjarlógini.

* Í løgukørmunum eru innroknaðar løgukendar útreiðslur. Í 2024 er talan um 131,5 mió. kr. tilsamans í løgukendum útreiðslum.

**Skjal hjálagt**

Skjal 1: Búskaparfrágreiðing I, mars 2023

Fíggjarmálaráðið, 31. mars 2023

Ruth Vang
landsstýrismaður

/Bjarni Askham Bjarnason

## Inngangur

Sambært § 8 í løgtingslóg nr. 42 frá 4. mai 2009 um landsins játtanarskipan skal frágreiðing (Búskaparfrágreiðing I), sum lýsir og metir um búskaparstøðu Føroya, harímillum tann almenna geiran, verða løgd við uppskotinum til løgtingssamtykt um játtanarkarmar. Uppskotið til løgtingssamtykt um játtanarkarmar fyri fíggjarlógina næsta ár skal leggjast fram fyri 1. apríl.

Uppskotið til løgtingssamtykt um játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2024 byggir í høvuðsheitum á løgtingsfíggjarlógina fyri 2023 (løgtingsmál nr. 47/2022). Nýggjar og dagførdar framskrivingar eru gjørdar av inntøkum og útreiðslum.

Frágreiðingin er sett soleiðis saman, at fyrst er stutt lýsing av gongdini í føroyska búskapinum, síðani av altjóða búskapinum og at enda av almenna búskapinum. Síðst í fylgiskjal við meting av almenna íløgutørvinum næstu um 15 árini.

## Lýsing av gongdini í búskapinum

Vøkstur er framvegis í føroyska búskapinum, men óvissa er eisini um gongdina næstu 1-2 árini. Hagtølini benda á, at lutfalsliga stórur vøkstur var í búskapinum í 2021 og 2022. Í 2021 kom búskapurin fyri seg aftur eftir ávirkanirnar av korona í 2020.

Bruttotjóðarúrtøkan vaks sambært metingum um 10% í 2022 í ársins prísum. Fíggjarmálaráðið roknar við, at BTÚ hækkar eini 4-5% í 2023 og í 2024 (ársins prísir). Væntaði vøksturin í 2023 og 2024 er treytaður av gongdini í altjóða búskapinum og serliga av viðurskiftum, sum hava við kríggið í Ukraina at gera, umframt at prísvøksturin og væntaðar rentuhækkingar koma at ávirka gongdina.

**Mynd 1**

**Bruttotjóðarúrtøka, broyting í % um árið, ársins prísir og fastir 2010-prísir, 2005-2024**




Viðm.: Tølini fyri 2022 til 2024 eru metingar og forsagnir og skulu lesast við fyrivarni.
Kelda: Hagstovan og metingar hjá Fíggjarmálaráðnum.

Mynd 1 omanfyri vísir gongdina í bruttotjóðarúrtøkuni árini 2005 til 2021 og metingar fyri árini 2022 til 2024. Føroyski tjóðarroknskapurin er gjørdur upp til og við 2021. Tølini fyri 2022 til 2024 eru metingar og forsagnir. Størsta orsakin til vøksturin í 2022 var, at útflutningurin hækkaði 2,7 mia. kr. í virði ella omanfyri 25%. Vøksturin í útflutninginum kom av høgum altjóða matvøruprísum, sum eisini ávirkaði útflutningin av fiskavørum úr Føroyum. Harafturat hava almennar og privatar íløgur stimbrað vøksturin í 2022.

Stórur vøkstur var í búskapinum frá 2012 til 2019. Hesi árini vaks bruttotjóðarúrtøkan úr um 14 mia. kr. til út við 22 mia. kr. (ársins prísir). Hesi árini var eisini lutfalsliga stórur vøkstur roknað í føstum prísum (mynd 2).

Uppgerðirnar av tjóðarroknskapinum í føstum prísum vísa, at búskaparvøksturin í Føroyum var størri enn í hinum Norðurlondunum árini 2009 til 2021. Hetta er víst í mynd 2 niðanfyri, har londini byrja við sama vísitali 100 í 2009.

Prísvøksturin innan matvørur síðsta árið hevur stimbrað føroyska útflutningin og búskapin. Vanlig húsarhald hava kortini ikki merkt, at stórur búskaparvøkstur var í 2022. Nýtsluvirðið av tøku inntøkuni hjá flestu húsarhaldum er helst minkað síðsta árið, tí fastar útreiðslur til upphiting, brennievni og mat eru hækkaðar nógv. Reallønin hjá flestu húsarhaldum minkaði tí helst í 2022.

Síðstu mánaðirnar eru oljuprísir lækkaðir aftur. Miðskeiðis í 2022 var prísurin á brent-olju um 120 USD fyri fatið, meðan prísurin í mars 2023 er um 80 USD fyri fatið, sum svarar til eina lækking á um 33%.

**Mynd 2**

**BTÚ í føsum prísum, býtt á lond 2008 = 100, 2008 til 2022, forsagnir og metingar eftir 2022**




Viðm.: Uppgerðirnar serliga fyri árini 2022 til 2024 eru metingar og forsagnir og skulu lesast við fyrivarnum.
Kelda: Hagstovan, OECD (2023), Real GDP forecast (indicator) og Danmarks Nationalbank, Udsigter for dansk økonomi, 15. mars 2023.

Síðstu árini er munandi ískoyti til vøksturin komið av privatum og almennum íløgum. Kríggið í Ukraina og óvissan um útlitini fara sannlíkt at minka hugin hjá fyritøkum og húsarhaldum at gera stórar íløgur, men roknast kann framvegis við nógvum almennum og privatum íløgum næstu 1-2 árini.

Síðstu árini er privata nýtslan vaksin javnt og støðugt, men hendan gongdin vendi aftur í 2022. Kríggið í Ukraina og høgi prísvøksturin í 2022 gjørdu, at stígur kom í vøksturin, sum var í privatu nýtsluni. Fíggjarmálaráðið roknar ikki við, at stórt ískoyti verður til vøksturin í búskapinum frá privatu nýtsluni í 2023 ella í 2024.

Miðbankarnir í USA og Evropa fara væntandi at hækka leiðandi renturnar nakrar ferðir aftrat í 2023 fyri at tálma prísvøkstrinum. Prísvøksturin og rentuhækkingarnar tálma eftirspurninginum, men flestu forsagnir benda á, at prísvøksturin er lækkaður til eitt meira vanligt støði aftur í 2024, tó at prísvøksturin helst verður omanfyri 2-3% eisini í 2024.

Tekin hava verið um fløskuhálsar í pørtum av búskapinum í nøkur ár og eru tað framvegis. Fløskuhálsarnir kunnu stimbra tær prís- og lønarhækkingar, sum eru orsakaðar av vanliga prísvøkstrinum. Fløskuhálsar síggjast til dømis á arbeiðsmarknaðinum, á bústaðamarknaðinum, og í pørtum av byggivinnuni. Grundað á stóra trotið á arbeiðsmegi í nógvum vinnugreinum, roknar Fíggjarmálaráðið framhaldandi við lágum arbeiðsloysi næstu 1-2 árini.

Skuldin hjá føroyskum húsarhaldum og vinnufyritøkum er ikki høg sammett við privata skuld í øðrum londum í vesturheiminum. Skuldin hjá føroyskum húsarhaldum (brutto) kann metast til 50-55% av BTÚ. Húsarhaldsskuldin í Danmark, Íslandi og Noregi er 80-90% av BTÚ. Í ES er húsarhaldsskuldin í miðal um 60% av BTÚ.

Síðsta árið eru bruttoútlán úr føroyskum peningastovnum til húsarhald í Føroyum vaksin út við 7% (ikki íroknað realkredittlán úr Danmark), meðan bruttoútlán til vinnukundar eru vaksin um 4% (mynd 3). Realkredittlánini til føroysk húsarhald eru vaksin um 1% síðsta árið, men vøksturin í realkredittlánunum steðgaði miðskeiðis í 2022 (mynd 3B).

**Mynd 3**

**Inn- og útlán til húsarhald og vinnufeløg, føroyskir peningastovnar, mia. kr., sept-2013 til jan-2023**




Viðm.: Nettoinnlánini í *mynd B* eru innlán frá húsarhaldum frádrigin útlán til húsarhald í *mynd A*.
Kelda: Hagstovan.

Frá 2019 til 2022 vuksu realkredittlánini til føroysk húsarhald nógv, men rentuhækkingarnar á realkredittlánum síðsta árið hava gjørt, at húsarhald hava tikið fleiri bankalán til fígging av bústøðum heldur enn realkredittlán (mynd 3B). Innlán hjá húsarhaldum í føroyskum peningastovnum hava verið rættiliga støðug síðsta árið. Innlán hjá føroyskum húsarhaldum eru vaksin um 2% síðsta árið, og innlán hjá føroyskum vinnufyritøkum eru vaksin um 18% síðsta árið.

**Mynd 4**

**Nýbygging av bústøðum um alt landið, nýíbindingar í elkervið hjá SEV, 1998 til 2022**




Viðm.: Myndin vísir nýíbindingar í elkervið hjá SEV um alt landið. Myndin fevnir um sethús, raðhús og íbúðir.
Kelda: Hagstovan.

Sethúsaprísir hækkaðu nógv um alt landið frá 2015 til 2022, men sethúsaprísir eru lækkaðir aftur annað hálvár 2022 sambært húsameklarum. Síðstu árini er útboðið av nýggjum bústøðum ikki

vaksið í sama mun sum eftirspurningurin. Fólkatalið er hækkað við um 6.000 fólkum síðani 2014, men sama tíðarskeið eru bygdar um 1.600 nýggjar búeindir sambært tølunum hjá SEV fyri nýíbindingar í elkervið (mynd 4). Tí hevur ikki verið bygt samsvarandi av nýggjum bústøðum síðani 2014, um lagt verður til grund, at um 2,5 fólk eru í hvørjum húski í miðal.

Virksemið í byggivinnuni er vaksið síðsta árið. Fleiri stórar byggiverkætlanir eru í gongd, og fleiri eru væntandi næstu árini. Til dømis kann roknast við, at tørvur verður á at byggja nógvar bústaðir næstu árini, bæði eigarabústaðir og leiguíbúðir. Sambært konjunkturvísitalinum hjá Hagstovuni siga fyritøkur í byggivinnuni frá, at eftirspurningurin er omanfyri miðal. Um onnur hvør fyritøka í byggivinnuni sigur frá, at mangul á arbeiðsmegi er størsta avmarkingin fyri at økja framleiðsluna. Fyritøkur í byggivinnuni rokna við at fáa størri tørv á arbeiðsmegi næsta árið.

### *Ískoytið til vøksturin frá útflutningsvinnunum hækkar væntandi í 2023*

Sannlíkindi eru fyri, at ískoytið til vøksturin frá útflutningsvinnunum hækkar nakað í 2023, men roknast kann ikki við sama vøkstri í 2024. Størsta orsakin er hækkingin í føroysku svartkjaftakvotuni í 2023 (81%). Makrelkvotan minkar eitt vet í 2023 (2%), og torført er at meta um føroysku kvotuna í 2024.

Makrelstovnurin hevur verið ovtroyttur av strandalondunum í fleiri ár, meðan eingin semja hevur verið millum strandalondini. Síðstu árini hevur tilgongdin av makreli verið góð, men stóra veiðan kann ikki halda fram í nógv ár frameftir. Neyðugt verður tí, at strandalondini semjast um býtið av makrelkvotuni og lækka heildarkvotuna.

Roknast kann við, at tøkan av aldum laksi verður á sama støði í 2023 sum í 2022. Fíggjarmálaráðið roknar við, at tøkan hækkar nakað aftur í 2024. Prísirnir á aldum laksi fyrstu mánaðirnar í 2023 hava verið omanfyri prísirnar somu tíð í 2022, og roknast kann eisini við høgum prísum restina av árinum, tó at hetta eisini er torført at meta um. Samanumtikið kann roknast við, at ískoyti til vøksturin frá alivinnuni verður áleið á sama støði í 2023 og 2024 sum undanfarin ár.

**Mynd 5**

**Tøka av aldum laksi og sílum í kruvdari vekt, býtt á ár, 1996 til 2023**




* Tøkan er í kruvdari vekt í tonsum. Tøkan í 2023 er meting.

Kelda: Hagstovan og Búskaparráðið.

Síðstu árini eru stórar íløgur gjørdar í smoltstøðir og kryvjivirki, og næstu 1-2 árini verða eisini gjørdar stórar íløgur. Úrslitini av íløgunum síggjast í størri tøku, og miðalstøddin á smoltum, sum

verða sett út, er hækkað úr um 200 gramm í 2016 til um 370 gramm í 2022. Útbyggingarnar fara væntandi at hava við sær, at framleiðslan av smolti á landi kann hækka, at miðalstøddin á smoltum hækkar til um 500 gramm og at vakstrartíðin á sjónum minkar úr um 18 mánaðir til um 12 mánaðir.

Árliga tøkan av alilaksi var millum 60 og 78 túsund tons í kruvdari vekt frá 2012 til 2020. Í 2021 vaks tøkan til út við 95 túsund tons í kruvdari vekt, sum eisini er væntaða tøkan í 2023. Mynd 5 omanfyri vísir tøku av aldum laksi síðani 1996 og mettu tøkuna í 2023.

Serliga fyrru helvt av 2022 vóru miðalprísir á aldum laksi óvanliga høgir, sum kom av høgum matvøruprísum orsakað av russisku innrásini í Ukraina. Miðalprísurin á fishpool vísitalinum var um 8,3 um EUR/kg í 2022, og higartil í 2023 hevur miðalprísurin verið um 9,6 EUR/kg.

Útlitini fyri prísgongdina restina av 2023 eru sum heild góð, tó at prísirnir kunnu lækka nakað frá verandi støði. Eftirspurningurin eftir aldum laksi veksur skjótt (um 10% árliga síðstu árini), meðan útboðið ikki hækkar í sama mun. Útboðið av alilaksi á heimsmarknaðinum verður mett at hækka um 2% í 2023, sum er munandi lægri enn vøksturin í eftirspurninginum.

Sambært stovnsmetingum hjá Havstovuni hevur toskastovnurin á Landgrunninum verið undir søguligum lágmarki síðani 2004. Í 2018 var toskastovnurin oman fyri lágmarksstødd av gýtingarstovninum, men síðan 2019 hava stovnsmetingarnar víst, at stovnurin aftur er undir hesum marki.

**Mynd 6**

**Føroyska feskfiskaveiðan eftir botnfiski í nøgd*, tús. tons, 1997 til 2022**




* Tølini vísa veiðina, sum verður skrásett um avreiðingarskipanina og í avreiddari vekt. Í avreiðingunum er allur fiskiskapur hjá føroyskum skipum og bátum í føroyskum sjóøki, føroyska feskfiskaveiðan í íslendskum sjóøki og fiskiskapurin á Flemish Cap, sum fer um avreiðingarskipanina. Uppsjóvarfiskur er ikki við í uppgerðini.

Kelda: Hagstovan.

Sambært Havstovuni var gongdin vánalig árini 2019 til 2022. Gróðurin sveik, tó at hann var omanfyri miðal í 2022. Samstundis minkaði tilgongdin av 1 og 2 ára gomlum toski og hýsu. Úrslitið er, at toskastovnurin ikki væntast at hækka í framtíðini, sum annars hevur verið væntað. Føroyski hýsustovnurin var í tíðarskeiðnum frá 2008-2017 undir markinum, har serlig verjutiltøk eru neyðug. Hýsustovnurin kom upp um hetta markið í 2018 og hevur verið í vøkstri síðan.

Mynd 6 vísir avreiðingar av botnfiski um avreiðingarskipanina í nøgd. Á myndini sæst, at nøgdirnar av feskfiski um avreiðingarskipanina eru smærri enn miðskeiðis í 1990'unum.

*Gongdin á arbeiðsmarknaðinum*

Arbeiðsmarknaðurin í Føroyum er væl fyri, men trýstið á arbeiðsmarknaðin er sera stórt, og trot er á arbeiðsmegi í fleiri vinnugreinum, serstakliga á faklærdari arbeiðsmegi. Trýstið á arbeiðsmarknaðin er ein fløskuhálsur í búskapinum og forðar fyri, at framleiðslan kann vaksa meira. Arbeiðsloysið er lægri enn áðrenn koronufarsóttin byrjaði í 2020, sí mynd 7.

**Mynd 7**
**Árstíðarjavnað arbeiðsloysi í % av arbeiðsfjøld, jan-2005 til jan-2023**




Kelda: Hagstovan.

Arbeiðsloysið við ársskiftið 2022/23 var 0,8% av arbeiðsfjøldini (mynd 7A). Arbeiðsloysið hækkaði nakað seinna hálvár 2020, tá ið korona ávirkaði, men arbeiðsloysið er nú tað lægsta, sum er skrásett síðani miðskeiðis í 1990'unum, tá ið skrásetingarnar byrjaðu, og arbeiðsloysið er eisini lágt um alt landið.

Talið á løntakarum er eisini methøgt um 28 túsund (árstíðarjavnað). Løntakaratalið lækkaði miðskeiðis í 2020 orsakað av koronufarsóttini, men síðani er løntakaratalið vaksið støðugt aftur (mynd 7B).

**Mynd 8**

**Lønargjaldingar, býttar á ársfjórðingar, 1. ársfjórðing 1985 til 4. ársfjórðing 2022**




Viðm.: Mynd A vísir samlaðar lønargjaldingar í øllum vinnugreinum 1. ársfjórðing 1985 til 4. ársfjórðing 2022.
Mynd B vísir lønargjaldingar í fýra útvaldum vinnugreinum 1. ársfjórðing 2000 til 4. ársfjórðing 2022.
Kelda: Hagstovan.

Gongdin í lønargjaldingum fyri árini 2018 til 2022 og býtt á høvuðsvinnubólkar sæst í talvu 1. Samanumtikið vuksu lønargjaldingarnar út við 5% í 2022. Serliga lønargjaldingar innan fiski- og alivinnu vuksu í 2022 (mynd 8B og talva 1). Lønargjaldingarnar hækkaðu um 4% bæði í privatu og almennu tænastuvinnunum. Í byggivinnuni vuksu lønargjaldingarnar 1% í 2022.

**Talva 1**

**Lønargjaldingar eftir høvuðsvinnubólkum, 2019-2022, mió. kr.**

| Vinnugrein | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | Munur 2021-22 | Munur í % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fiski-, ali- o.o. ráevnisvinna | 2.010 | 1.968 | 1.973 | 2.201 | 230 | 11,6 |
| Byggivinna o.o. tilvirking | 1.632 | 1.722 | 1.659 | 1.676 | 17 | 1,0 |
| Privatar tænastuvinnur | 3.113 | 3.116 | 3.348 | 3.473 | 125 | 3,7 |
| Almenn o.o. tænasta | 3.309 | 3.465 | 3.667 | 3.821 | 154 | 4,2 |
| **Lønargjaldingar tilsamans** | **10.064** | **10.271** | **10.646** | **11.170** | **524** | **4,9** |

Kelda: Hagstovan.

Talið av løntakarum vaks frá 2014 til 2020 (mynd 7B) til út við 27 túsund løntakarar. Talið av løntakarum lækkaði síðani til um 25 túsund í apríl 2020 orsakað av koronufarsóttini. Síðani er talið av løntakarum vaksið aftur til um 28 túsund. Nevnt kann verða, at persónar, sum bara hava B-inntøku ella sum bara hava inntøku uttanlands eru ikki íroknaðir í talið á løntakarum í mynd 7 ella í talvu 2.

**Talva 2**

**Løntakarar í februar eftir høvuðsvinnubólkum, 2020-2023, fólk í tali**

| Vinnubólkur | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | Munur 2022-23 | Munur í % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fiski-, ali- o.o. ráevnisvinna | 4.131 | 4.133 | 3.944 | 4.099 | 155 | 3,9 |
| Byggivinna o.o. tilvirking | 4.377 | 4.257 | 4.211 | 4.323 | 112 | 2,7 |
| Privatar tænastuvinnur | 8.577 | 8.511 | 8.759 | 8.849 | 90 | 1,0 |
| Almenn o.o. tænasta | 9.749 | 10.037 | 10.272 | 10.454 | 182 | 1,8 |
| **Løntakarar tilsamans** | **26.814** | **26.938** | **27.186** | **27.725** | **539** | **2,0** |

Kelda: Hagstovan.

Talva 2 vísir gongdina í løntakarum í februar býtt á høvuðsvinnugreinar síðani 2020. Síðani 2020 er løntakaratalið vaksið mest í privatu tænastuvinnunum og innan almenna o.a. tænastu. Vøksturin í talinum av løntakarum í byggivinnuni steðgaði miðskeiðis í 2020, tá ið koronufarsóttin byrjaði og fleiri stórar byggiverkætlanin vóru liðugt bygdar. Síðani kom meira ferð á aftur byggivinnuna í 2022, og fleiri stórar byggiverkætlanir eru í gongd og aðrar ávegis. Løntakaratalið í byggivinnuni er vaksið um 3% síðsta árið, sí talvu 2.

## *Eftirspurningur og brúkaraprísir*

Eftirspurningurin frá húsarhaldum vaks javnt og støðugt til 2022, tá ið prísvøksturin av álvara tók dik á seg (mynd 9). Hagtøl fyri vøruinnflutning benda á, at eftirspurningurin í Føroyum vaks nógv í tíðini við korona í 2020. Innflutningurin til beinleiðis húsarhaldsnýtslu vaks um 1,2% í tólv-mánaðarskeiðnum frá februar 2022 til januar 2023 í virði. Hetta er lítil vøkstur, um hugsað verður um stóra prísvøksturin í 2022.

**Mynd 9**

**Innflutningur av ódrúgvum, drúgvum og hálvdrúgvum nýtsluvørum og útgoldnar lønir, jan-1998 til feb-2023**




Viðm.: Myndin vísir 12-mánaðar samanløgd tøl fyri tær tríggjar strikurnar í myndini.

Kelda: Hagstovan.

Sambært handilsvinnuni hava húsarhald tillagað sína nýtslu til prísvøksturin, sum hevur verið síðsta árið. Hetta merkir, at húsarhald nú keypa bíligari og heldur færri vørur og hava skorið tað burtur av nýtsluni, sum lætt kundi skerast burtur.

Fíggjarmálaráðið roknar ikki við, at eftirspurningurin veksur stórvegis næstu 1-2 árini. Størsta orsøkin er prísvøksturin innan gerandisvørur og neyðsynjarvørur, sum sæst í løtuni og sum eisini kann væntast alt 2023 og lutvíst í 2024. Roknast kann sum heild við heldur høgum prísvøkstri í 2023 og 2024 á 3-4% árliga.

**Mynd 10**
**Smásøla í føstum prísum, býtt á vørubólkar og ársfjórðingar (trendur), 2005 = 100, 2005 til 2022**




Kelda: Hagstovan.

Roknast kann eisini við hækkandi rentum í øllum førum til á heysti 2023, tá ið renturnar møguliga fara at seta seg. Hækkandi renturnar ávirka eisini eftirspurningin frá húsarhaldum. Prísvøksturin og rentuhækkingarnar gera, at húsarhald hava minni av tøkum peningi til privata nýtslu, og hetta fer væntandi at tálma privatu nýtsluna næstu 1-2 árini.

Eisini kann nevnast, at húsaprísir eru lækkaðir seinna hálvár 2022, og rentuhækkingarnar, sum væntast at koma aftrat í 2023 fara sannlíkt eisini at gera, at húsaprísir lækka nakað í 2023. Danski Tjóðbankin væntar til dømis, at húsaprísir í Danmark lækka 9-10% í 2023.

Á mynd 10, sum vísir hagtøl yvir smásølu í føstum prísum fyri ymiskar vørubólkar, sæst, at privati eftirspurningurin hækkaði í 2020 undir korona og lækkaði síðani nakað aftur í 2021. Smásøla er søla hjá handlum til privata nýtslu og lýsir gongdina í umsetninginum og broytingar á seldum mongdum. Myndin vísir, at privati eftirspurningurin er lækkaður nakað aftur í 2022.

Sambært konjunkturkanningini frá Hagstovuni í januar 2023 er vísitalið fyri brúkaravæntanirnar hækkað eitt vet úr -5 til 0 (mynd 11B). Flestu húsarhald rokna við, at teirra fíggjarstøðu og búskaparstøðan í Føroyum vera at kalla óbroytt ella at støðan versnar nakað næsta árið. Hetta stuðlar eisini undir, at sannlíkindi eru ikki fyri stórum vøkstri í eftirspurninginum næstu 1-2 árini.

**Mynd 11**

**Samanvigað konjunkturvísital og vísital fyri húsarhald, jan-2006 til jan-2023**




Kelda: Hagstovan.

Mynd 11 vísir samanvigaða vísitalið og vísitalið fyri húsarhald. Samanvigaða konjunkturvísitalið fyri vinnu og húsarhald lækkaði frá 29 til 17 í síðstu konjunkturkanningini (mynd 11A).

Brúkaraprístalið var rættiliga støðugt frá 2009 til 2021, men seinna hálvár 2021 vóru stórar hækkingar í prístalinum, og prísvøksturin helt fram og tók dik á seg í 2022. Prísvøksturin fer helst at halda fram restina av 2023. Síðsta árið eru brúkaraprísir hækkaðir um 10%, sum er største hækking í brúkaraprísunum síðani í 1980'unum. Brúkaraprístalið er víst í mynd 12 niðanfyri.

Týdningurin av brennievni í føroyska innflutninginum er sera stórur, tí um 19% av innflutninginum í 2022 var brennievni og tílíkt. Rentustøðið hevur eisini stóra ávirkan á gongdina í brúkaraprísum og serliga á kostnaðin av at eiga ella leiga sær bústað. Síðsta árið er rentustøðið hækkað munandi, sum sæst aftur í brúkaraprístalinum.

**Mynd 12**

**Brúkaraprístalið, 1. ársfjórðing 2001 til 4. ársfjórðing 2022, býtt á ársfjórðingar, indeks 2001 = 100**




Kelda: Hagstovan.

## *Gongdin í til- og fráflyting*

Nettotilflyting er framvegis til landið á um 500 fólk árliga. Tilflytingin hevur verið um 500 fólk netto árliga síðani 2018 (mynd 13). Í 2020 minkaðu bæði tilflyting og fráflyting nakað, sum óivað

kom av koronufarsóttini. Í løtuni eru ikki tekin um, at gongdin við nettotilflyting og fólkavøkstri, sum byrjaði í 2014, er um at steðga aftur. Burðaravlopið minkaði nakað í 2022, sum síðani gjørdi, at fólkavøksturin eisini minkaði nakað sammett við undanfarin ár (mynd 14).

**Mynd 13**

**Nettoflyting til Føroyar, 12 mánaðir samanlagt, til- og fráflyting, jan-2007 til jan-2023**




Viðm.: Grønu og reyðu stabbarnir vísa ávikavist til- og fráflyting hvønn mánaða.
Kelda: Hagstovan.

Nettotilflytingin er á áleið sama støði sum árini beint eftir aldaskiftið, tá ið búskapurin fótaði sær aftur eftir kreppuna í 1990'unum (mynd 14). Fráflytingin hevur verið um 1.200 fólk um árið síðstu árini, og tilflytingin í 2022 var út við 1.800 fólk.

**Mynd 14**

**Broytingar í fólkatalinum, 1970 til 2022**




Kelda: Hagstovan.

Sum partur av fólkatalinum hevur fráflytingin síðani 2015 verið tann minsta, sum er skrásett, síðani nágreiniligar skrásetingar byrjaðu í 1970. Tilflytingin hevur verið stór síðstu árini og serliga síðani 2016. Samanlagda úrslitið av minni fráflyting og størri tilflyting síðani 2014 er, at nettotilflytingin er vaksin í stórum.

**Mynd 15**
**Fólkatalið í Føroyum 1. januar, 1985-2023**




Kelda: Hagstovan.

Gongdin við nettotilflyting til landið er tekin um, at arbeiðsmarknaðurin hevur verið væl fyri í fleiri ár og at fleiri størv hava tikið seg upp í landinum. Ein onnur orsøk til gongdina er, at útbúgvingarmøguleikarnir eru vorðnir betri og at færri tí fara av landinum at útbúgva seg. Síðstu árini eru fleiri nýggjar útbúgvingar byrjaðar bæði á miðnámsstigi og innan hægri útbúgvingar. Nettotilflytingin býtt á mánaðir og ár er víst í myndunum 13 og 14.

**Talva 3**
**Fólkatalið býtt á øki í landinum, 1. feb. 2022 til 1. feb. 2023**

| Øki í landinum | Fólkatal 1. feb. 2022 | Burðaravlop | Nettoflyting | Fólkatal 1. feb. 2023 | Broyting í tali | Broyting í % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Norðoya øki | 6.338 | 25 | 42 | 6.405 | 67 | 1,1 |
| Eysturoyar øki | 12.222 | 46 | 181 | 12.449 | 227 | 1,9 |
| Tórshavnarøkið | 20.800 | 89 | 220 | 21.109 | 309 | 1,5 |
| Streymoyarøkið annars | 4.968 | 4 | -2 | 4.970 | 2 | 0,0 |
| Vága øki | 3.393 | 1 | 35 | 3.429 | 36 | 1,1 |
| Sandoyar øki | 1.257 | -9 | 13 | 1.261 | 4 | 0,3 |
| Suðuroyar øki | 4.661 | -12 | 1 | 4.650 | -11 | -0,2 |
| **Alt landið** | **53.639** | **144** | **490** | **54.273** | **634** | **1,2** |

Viðm.: Tórshavnarøkið er Tórshavn, Hoyvík og Argir.
Kelda: Hagstovan.

At nettotilflyting er til landið er eitt gott tekin fyri búskapin. Heldur tilflytingin fram, fer tað at betra langtíðarhaldførið í búskapinum. Hóast nettotilflyting er til landið nú, benda framrokningar greitt á, at alders- og fólkasamansetingin fer at broytast næstu árini soleiðis at lutfalsliga færri fólk vera í arbeiðsførum aldri. Hetta er eisini orsakin til, at stórar avbjóðingar eru við haldførinum í almenna búskapinum, hóast tilflyting er og fólkatalið helst fer at hækka nakað næstu árini.

Á mynd 15 omanfyri sæst, at fólkatalið í Føroyum er omanfyri 54 túsund fólk (sí eisini talvu 3). Myndin vísir eisini, at fólkatalið ikki hækkaði stórvegis tey 25 árini frá 1990 til 2014. Varandi og støðugur fólkavøkstur hevur nú tikið seg upp í landinum eins og árini um aldaskiftið, tá ið búskapurin fótaði sær aftur eftir kreppuna í 1990'unum. Greitt er kortini, at nettotilflytingin kann venda aftur til fráflyting, eins og støðan var árini 2004 til 2013.

Størsti parturin av fólkavøkstrinum síðstu árini hevur verið í miðøkinum í landinum og serstakliga í høvuðsstaðarøkinum og í Eysturoynni. Nevnast kann, at Suðuroyggin og Sandoyggin ikki hava havt sama fólkavøkstur sum onnur øki í landinum síðani 2014. Í talvu 3 síggjast broytingar í fólkatalinum síðstu 12 mánaðirnar býtt á høvuðsøki.

## Viðskifti við útlond, handils- og gjaldsjavni

Gongdin á handils- og gjaldsjavnanum síðstu árini er merkt av, at býtislutfallið í uttanríkishandlinum er batnað munandi síðani 2013. At býtislutfallið er batnað merkir, at prísirnir á útfluttum vørum eru hækkaðir sammett við prísirnir á innfluttum vørum, til dømis á olju. Býtislutfallið versnaði tó helst í 2020 og 2021 av høgum oljuprísum. Í 2022 hækkaðu bæði útflutnings- og innflutningsprísir munandi.

**Mynd 16**

**Innflutningur og útflutningur av vørum, mió. kr., 1988 til 2022**




Viðm.: Handilsjavnin fevnir bara um vørur; tænastur eru sostatt ikki við í uppgerðini av handilsjavnanum.
Kelda: Hagstovan.

Síðani 2013 hava avlop verið á handilsjavnanum. Í 2022 hækkaðu bæði útflutningur og innflutningur munandi. Innflutningurin vaks í stóran mun orsakað av høgum oljuprísum og av nýggjum skipum, sum vórðu innflutt í 2022. Roknast kann við, at avlop eisini verður á handilsjavnanum í 2023.

**Mynd 17**

**Rakstrarviðskifti gjaldsjavnans í mió. kr., 1998 til 2022**




* Talið fyri 2022 er meting og skal lesast við fyrivarni.
Kelda: Hagstovan.

Myndirnar 16 og 17 vísa gongdina í handils- og gjaldsjavnanum síðstu árini. Handilsjavnin fevnir um vøruhandil við útlond; tænastuveitingar til og frá útlondum eru sostatt ikki taldar við í handilsjavnan. Tænastuveitingar eru hinvegin taldar við í *vøru- og tænastujavnan*. Uppgerðir hjá Hagstovuni av tænastujavnanum benda á, at Føroyar hava hall á tænastujavnanum við útlond á út við eina mia. kr. árliga, tó at nakað av óvissu er um hesa uppgerðina.

Handilsjavnin sveiggjar nógv frá ári til ár alt eftir privatari nýtslu, íløgum í vinnulívinum, oljuprísum og útflutningsvirðinum á fiski og aldum laksi. Eins og víst í mynd 16 omanfyri, er føroyski útflutningurin vaksin úr 4,2 mia. kr. í 2009 til omanfyri 12 mia. kr. í 2022. Helst hækkar útflutningurin aftur í 2023. Útflutningurin er sostatt trýfaldaður síðani 2009 í ársins prísum.

Størstu orsakirnar til stóra vøksturin í innflutninginum í 2022 vóru í fyrra lagi høgir oljuprísir og í øðrum lagi, at fleiri nýggj skip vórðu innflutt í 2022.

## Heimsbúskapurin

Útlitini fyri búskaparvøkstri í 2023 og 2024 eru óviss, og óvissan er blivin størri síðstu mánaðirnar. Búskapirnir í USA og Evropa eru framvegis merktir av prísvøkstri og hækkandi rentum, sum tálma vøkstrinum í búskapinum. Hækkandi rentur, høgur prísvøkstur og óvissa um útlitini hava við sær, at roknað verður við lítlum vøkstri í privatu nýtsluni og í privatu íløgunum í Evropa og USA.

Harafturat hevur órógv verið á fíggjarmarknaðunum síðstu mánaðirnar, og óvissa er um, hvussu mótstøðuførir fíggjarstovnar og bústaðarmarknaðir eru mótvegis hækkandi rentustøðinum. Prísvøksturin hevur í ávísan mun bitið seg fastan, og nógv bendir á, at prísvøksturin og rentuhækkingarnar fara at ávirka alt árið 2023 og nakað inn í 2024 eisini.

Útlitini fyri búskaparvøkstri í 2023 og 2024 eru kortini batnað nakað síðstu mánaðirnar, um sammett verður við støðuna síðst í 2022. Orsakirnar eru, at matvøru- og oljuprísir eru lækkaðir síðstu mánaðirnar og at koronuavmarkingar eru strikaðar í Kina. Talva 4 vísir metingar og forsagnir hjá OECD um búskaparvøkstur í 2023 og 2024. Roknast kann við, at heimsbúskapurin veksur 2,6% í 2023 og um 3% í 2024.

Búskapurin í Evropa vaks sambært metingum 3,5% í 2022 og veksur væntandi um 1% í 2023 og 1-2% í 2024. Í USA kann roknast við búskaparvøkstri á 1-2% í 2023 og um 1% í 2024.

**Talva 4**
**Árligur vøkstur í BTÚ í føstum prísum 2020-2024 býtt á lond og øki**

| *% um árið í føstum prísum** | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 |
|---|---|---|---|---|---|
| USA | -2,8 | 5,9 | 2,1 | 1,5 | 0,9 |
| Evruøkið | -6,3 | 5,3 | 3,5 | 0,8 | 1,5 |
| Týskland | -4,1 | 2,6 | 1,9 | 0,3 | 1,7 |
| Bretland | -11,0 | 7,5 | 4,0 | -0,2 | 0,9 |
| Danmark | -2,0 | 4,9 | 3,6 | 0,2 | 1,5 |
| Heimsbúskapurin | -3,2 | 5,9 | 3,2 | 2,6 | 2,9 |

* Uppgerðirnar serliga fyri árini 2022 til 2024 eru metingar og forsagnir og lesast skiljast við fyrivarnum. Metingar fyri Danmark eru metingar og forsagnir hjá danska Finansministeriet, Økonomisk Redegørelse, 23. mars 2023.
Kelda: OECD Economic Outlook, Interim Report March 2023 og Finansministeriet, Økonomisk Redegørelse, 23. mars 2023.

Hóast matvøru- og oljuprísir eru lækkaðir síðstu mánaðirnar, benda forsagnir á, at prísvøksturin í Evropa verður um 6% í 2023 og um 3% í 2024. Hetta er nakað hægri enn tann prísvøksturin, sum miðbankar vanliga halda vera ein hóskandi prísvøkstur. Tí er væntandi, at miðbankar fara at hækka leiðandi renturnar nakrar ferðir aftrat í 2023 fyri at tálma prísvøkstrinum.

Flestu forsagnir benda á, at miðbankarnir í USA og Evropa fara at hækka leiðandi renturnar nakrar ferðir aftrat í 2023, og at leiðandi renturnar hækka til um 4% í Evropa og um 5,5% í USA miðskeiðis í 2023. Miðbankarnir í USA og Evropa hava eisini givið ábendingar um, at teir fara at minka tey stuðulstiltøk, sum miðbankarnir hava sett í verk fyri at stuðla búskapinum síðstu árini. Í USA og Evropa eru eisini fløskuhálsar á arbeiðsmarknaðinum, sum tálma búskaparvøkstrinum.

## Almenn fíggjarmál

Her verður stutt hugt eftir gongdini í úrslitinum hjá landskassanum og kommunum síðstu árini. Mynd 18 niðanfyri vísir gongdina í inntøkum og útreiðslum hjá landskassanum og í RLÚ-úrsliti síðani 1997 við mettum tølum fyri 2022, fíggjarlógartølum fyri 2023 og tølum fyri árini 2024-28 úr uppskotinum til samtyktar um játtanarkarmar fyri fíggjarárið 2024.

**Mynd 18**

**Úrslit landskassans, mió. kr., 1997 til 2022, játtanar- og ætlanartøl fyri 2023 til 2028**




Viðm.: Tølini fram til og við 2021 eru roknskapartøl. Avlopið í 2022 verður mett til um 180 mió. kr. Tølini fyri 2023 eru úr fíggjarlógini fyri 2023 við átøkum og tølini fyri 2024 til 2028 eru úr uppskotinum til samtyktar um játtanarkarmar. Kommunurnar yvirtóku eldraøkið í 2015. Tí lækkaðu inntøkur og útreiðslur hjá landinum í 2015.
Kelda: Gjaldstovan og Fíggjarmálaráðið.

Landskassin hevur havt avlop øll árini síðani 2016, tó ikki í 2020, sum var ávirkað av koronufarsóttini. Úrslitið hjá landskassanum fyri 2022 er ikki endaliga gjørt upp enn, men Fíggjarmálaráðið roknar við, at úrslitið hjá landskassanum var um 180 mió. kr. í avlopi í 2022.

Úrslitið á fíggjarlógini fyri 2023 er avlop á um 144 mió. kr. Harafturat verður roknað við átøkum og tiltøkum í 2023 fyri um 160 mió. kr. Ein týðandi orsøk til avlopið í 2022 á um 180 mió. kr. var, at stórur partur av løgujáttanunum ikki vórðu brúktar, men eru fluttar fram til 2023. Tilsamans verða um 300 mió. kr. í óbrúktum løgujáttanum fluttar til 2023. Verður helvtin av framfluttu løgujáttanunum nýttar í 2023, kann roknast við avlopi í 2023 á um 150 mió. kr.

Inntøkurnar hjá landinum frá skattum og avgjøldum hava síðstu nógvu árini verið munandi størri enn væntað. Inntøkurnar hjá landskassanum ávirkast nógv av konjunkturgongdini, meðan útreiðslurnar vaksa meira støðugt og ikki broytast í sama mun. Í 2022 vuksu inntøkurnar hjá landinum skjótari enn útreiðslurnar, orsakað av góðari gongd í búskapinum og vaksandi privatari nýtslu. Inntøkurnar vuksu um 6% í 2022, og sambært fyribils tølum fyri 2022 hækkaðu rakstrarútreiðslurnar hjá landinum um 5% í 2022.

Mynd 19 vísir gongdina í langfreistaðu skuldini (brutto) og innistandandi hjá landinum. Gongdin frá 2008 til 2014, har útreiðslurnar vóru hægri enn inntøkurnar, sæst aftur sum vaksandi skuld hesi árini. Føroyski búskapurin vaks kortini somikið nógv hesi árini, at skuldin vaks ikki stórvegis sum partur av búskapinum. Síðani 2014 hevur verið betri javnvág millum inntøkur og útreiðslur hjá

landinum. Orsøkin til lopið í skuldini frá 2017 er lánið til felagið P/F Eystur- og Sandoyartunlar, sum verður talt við sum skuld hjá landinum.

**Mynd 19**

**Langfreistaða skuld landskassans og gjaldføri landskassans í mió. kr., 1997 til 2023**




Viðm.: Skuldin hjá almenna felagnum P/F Eystur- og Sandoyartunlar er íroknað landskassaskuldina frá 2017.
Kelda: Gjaldstovan, Landsbankin og Fíggjarmálaráðið.

Sambært Landsbanka Føroya eigur skuldin hjá almenna felagnum P/F Eystur- og Sandoyartunlar at verða íroknað skuldina hjá landinum. Tunnilsfelagið tók lánið síðst í 2016. Lánið verður íroknað landskassaskuldina frá 2017, tí landið hevur veðhildið fyri lánið og rindar í løtuni eina upphædd árliga til felagið sum partur av veðhaldinum. Í løtuni er felagið P/F Eystur- og Sandoyartunlar ikki sjálvberandi og ikki ført fyri at rinda alla skuldina aftur við egnum inntøkum. Tí verður skuldin hjá felagnum tald við í skuldina hjá landinum.

Tað almenna í Føroyum er ikki serstakliga skuldarbundið, um sammett verður við onnur lond í vesturheiminum. Bruttoskuldin hjá landinum er um 15% av BTÚ, og kommunurnar hava bruttoskuld á um 1,5 mia. kr. ella 5-6% av BTÚ. Almenna felagið P/F Eystur- og Sandoyartunlar hevur harafturat skuld á um 2,6 mia. kr., ella um 10% av BTÚ, sum landið hevur veðhildið fyri.

Hetta gevur tilsamans eina almenna bruttoskuld á 30-35% av BTÚ, sum er nakað tað sama sum í Danmark. Almenna bruttoskuldin í londunum í Evropa er til sammetingar 90-95% av BTÚ í miðal. Almenna skuldin í Íslandi er mett til 70-75% av BTÚ. Her er talan um sonevnda EGS-skuld (*ØMU-gæld*), sum er sambærilig millum lond.

Fyri haldførið í almenna búskapinum er týdningarmikið, at nettoskuldin yvir longri áramál ikki veksur skjótari enn samlaðu inntøkurnar í samfelagnum, sum skulu fíggja rentuútreiðslurnar av skuldini.

Búskaparráðið hevur síðstu árini mett um langtíðarhaldførið í almenna búskapinum. Í nýggjastu frágreiðingini frá ráðnum verður nevnt, at haldførisavbjóðingar framvegis eru í almenna geiranum, og at tær í stóran mun stava frá broyttari fólkasamanseting, sum roknast kann við í framtíðini.

**Mynd 20**
**Nettoskuld landskassans (langfreistað skuld frádrigið gjaldføri) í mió. kr., 1997 til 2022**




Viðm.: Nettoskuld er í myndini víst sum langfreistaða skuldin hjá landskassanum frádrigið gjaldførið hjá landskassanum. Skuldin hjá almenna felagnum P/F Eystur- og Sandoyartunlar er íroknað landskassaskuldina frá 2017.
Kelda: Landsbankin.

Ein broyting, sum verður viðvíkjandi skuldini hjá landinum næstu árini, er, at rentustøðið á skuldini er framvegis lágt, og at tað fer at hækka næstu árini, so hvørt sum skuldin verður endurfíggjað. Við verandi rentuforsagnum er væntandi, at landskassin fer at rinda út við 150 mió. kr. í rentuútreiðslum brutto í 2026.

Tá ið rentustøðið hækkar, fer tað at kosta landi og kommunum pening í hægri rentuútreiðslum. Lánsbrævaskuldin hjá landinum er í løtuni um 3,5 mia. kr., og gjaldføri landsins er um 3,3 mia. kr. Nettoskuldin er sostatt um 200 mió. kr. umframt skuldina hjá felagnum P/F Eystur- og Sandoyartunlar. Gongdin í nettoskuldini hjá landskassanum er víst í mynd 20.

Kommunurnar høvdu tilsamans hall árini frá 2018 til 2021, men høvdu síðani helst lítið avlop í 2022. Sosialu grunnarnir hava hinvegin havt avlop samanlagt síðstu nógvu árini á 2-300 mió. kr. árliga. Úrslitini hjá kommununum fyri 2022 eru ikki gjørd endaliga upp enn, men kommunurnar høvdu sannlíkt lítið avlop á 10-20 mió. kr. í 2022. Úrslitið hjá tí almenna tilsamans í 2022 var helst avlop á 400-450 mió. kr., ella um 1,5% av BTÚ.

# Fylgiskjal A: Meting av almenna íløgutørvinum næstu um 15 árini

## Inngangur og bakgrund

Landið og kommunurnar hava tørv á at gera stórar íløgur næstu 15 árini á fleiri økjum, skal samfelagið framhaldandi mennast, og skal livistøðið í landinum framvegis vera eins høgt og í øðrum norðurlondum og í vestanlondum sum heild.

Uppritið tekur samanum tær stóru íløgurnar og verkætlanir, sum talan kann vera um at fara undir næstu árini. Uppritið lýsir, hvat tær merkja samanlagt fyri (langtíðar) íløguætlanina og samlaða íløgutørvin hjá landinum og kommununum næstu árini. Eisini verður lýst, hvat íløgutørvurin merkir fyri almennu skuldina næstu 15 árini.

Uppritið byggir á tilfar og ætlanir, sum hava verið alment frammi.

## Høvuðsrák krevja stórar íløgur næstu árini

Alt bendir á, at nøkur ávís høvuðsrák fara at merkja samfelagsmenningina í vestanlondunum næstu nógvu árini. Somu rák fara eisini at ávirka menningina í Føroyum næstu árini. Høvuðsrákini vera stýrandi fyri, hvørjar íløgur land og kommunur mugu og eiga at gera næstu árini í Føroyum, eins og í øðrum framkomnum londum. Høvuðsrákini eru í stuttum hesi:

- Menningin av undirstøðukervinum → íløgur í vegir, tunlar, ferjur o.s.fr. [🚇]
- Veðurlagsbroytingar → íløgur í grøna orkuskiftið [🌬]
- Demografiskar broytingar → íløgur í heilsu-, almannaverkið og eldraøkið [🧓]
- Talgildingin av samfelagnum → íløgur í KT og talgilding av almennum tænastum [💻]
- Útbúgving og gransking → íløgur í útbúgving og gransking [📖]
- Broytt trygdarpolitisk støða → íløgur í sambandi við trygdar- og verjupolitikk [🗺]

Í yvirlitinum omanfyri eru rákini hvør sær eyðmerkt við einum frámerki í [-]. Hetta er gjørt fyri at vísa, at tær flestu av stóru íløgunum, sum ætlanin er at fara undir næstu árini, kunnu setast í samband við okkurt av høvuðsrákunum omanfyri.

Alt bendir á, at viðurskiftini millum vestanlondini øðrumegin og Russland og Kina hinumegin vera meira spent og ótrygg næstu nógvu árini, sammett við undanfarnu 20-30 árini. Broytta trygdarpolitiska støðan í heiminum krevur av vestanlondunum, at tey seta meira pening av til trygdar- og verjupolitisk endamál. Danska stjórnin ætlar til dømis at seta ein radara upp í Føroyum. Hetta fer kortini neyvan at ávirka íløgukarmin hjá landinum stórvegis, tí verju- og trygdarmál eru donsk málsøki.

Møguleikarnir fyri útbúgving og gransking eru serliga umráðandi fyri livistøðið í smáum og fjarskotnum samfeløgum. Fyri smá og fjarskotin samfeløg er avgerandi, at størv eru til tey við miðallongum og longum útbúgvingum, skulu fólk støðast í tílíkum støðum. Tí vera íløgur innan útbúgving og gransking avgerandi fyri menningina og livistøðið í Føroyum næstu nógvu árini.

Roknast kann við, at menningin av undirstøðukervinum fer at halda fram næstu 15 árini, tí undirstøðukervið er umráðandi fyri livistøðið í smáum og fjarskotnum oyggjasamfeløgum. Tørvur er til dømis á at endurnýggja fleiri av ferjunum hjá SSL, umframt at nakrar bygdir enn hava ótíðarhóskandi samband við meginøkið.

**Fíggjarligu fortreytirnar hjá tí almenna í Føroyum**
Samanumtikið eru fíggjarligu fortreytirnar hjá almennu Føroyum góðar. Føroyska EGS-skuldin kann metast til 30-35% av BTÚ í 2022 (mynd A1).

EGS stendur fyri Evropeiska Gjaldoyra Samstarvið, og EGS skuld er ein háttur at rokna almenna bruttoskuld, ið ger tað møguligt at samanbera skuldarstigið millum lond. Á donskum verður tað rópt ØMU (Økonomisk Monetær Union) og á enskum EMU (Economic and Monetary Union).

Skuldin hjá almennum feløgum, sum landið veðheldur fyri, verður eisini roknað við, tá ið almenn feløg ikki eru sjálvberandi, og landið má gjalda vegna veðhaldið. Harafturat fevnir almenna skuldin um skuldina hjá stjórnarmyndugleikanum, landspartamyndugleikum (regiónum), kommunum og sosialum grunnum.

Kann eitt alment felag, sum hevur skuld, ikki afturgjalda skuldina við egnum inntøkum, verður skuldin, sum meginregla roknað við í almennu EGS-skuldina. Tí er skuldin hjá P/F Eystur- og Sandoyartunlunum roknað við í almennu skuldini hjá Føroyum.

---

**Mynd A1**
**Almenn bruttoskuld í ymsum londum 2021, EGS-skuld, almenn fyrisiting og tænastur**




Kelda: Landsbankin.

---

**Nógvar ætlanir fyri framman**
Síðstu árini hava nógvar almennar íløguverkætlanir verið umtalaðar og fráboðaðar. Niðanfyri eru nakrar teirra vístar:


LANDSVERK
FORKANNING AV EINARI NÝGGJARI SUÐUROYARLEIÐ
Samfelagsligar, búskaparligar og umhvørvisligar greiningar


ORKUGOYMSLUR Í FØROYUM
yvirskipað frágreiðing
umhvørvisstovan
DANSK ENERGI
SEV


SAMFERÐSLUÆTLAN
2018-2030


Strandferðslan
frameftir


Í GÓÐUM HONDUM
Starvsfólkatørvur á vælferðarøkinum
– avbjóðingar og uppskot til loysnir


Frágreiðing
um bústaðapolitisk átøk
ALMANNAMÁLARÁÐIÐ


5G
ERICSSON
FØROYA TELE


TJÓÐLEIKHÚS


FIPUR
TIL HEIMIÐ
EIN VERKÆTLAN HJÁ NET


ORKUPOLITISK ÆTLAN
– hvussu vit røkka málunum
fram til 2025 og 2030
HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ


FU
Færøernes Universitet - Strategisk Campusplan
Fróðskaparsetur Føroya
December 2018
Henning Larsen


Uppskot til hoyringar
umhvørvisstovan
Uppskot til Orku- og veðurlagspolitikk 2021-2030
Útgáva 0 12. mars 2021

**Samanteljing av íløgutørvinum næstu árini**
Niðanfyri er íløgutørvurin hjá tí almenna býttur á høvuðsøki, og kostnaðarmeting er gjørd í 2022Q4-prísum og við neyðugum váðaískoyti.

**Samferðsluætlanin hjá Landsverki []**
Nýggjasta samferðsluætlanin hjá Landsverki er frá 2018. Landsverk er í ferð við at dagføra samferðsluætlanina, sum væntandi verður tøk seinni í 2023.

Tær størstu íløgurnar í tí ætlanini eru vístar í talvuni niðanfyri. Kostnaðarmetingarnar frá 2018 eru hækkað 32% (samsvarandi norska *Byggekostnadsindeks for veganlegg* frá 2018Q4 til 2022Q4). Hóskandi váðaískoyti er eisini lagt omaná kostnaðarmetingina samsvarandi talvuni niðanfyri.

| *Talva A1 : Samferðsluætlanin []* | *Kostnaðarmeting frá 2018 (mió. kr.)* | *Kostnaðarmeting 2022Q4 (mió. kr.)* | *Váðaískoyti (%)* | *Kostnaðarmeting við váðaískoyti (mió. kr.)* |
|---|---|---|---|---|
| Byrgingin um Haraldsund | 32 | 42 | 30 | 55 |
| Umkoyringarv. í Klaksvík | 65 | 86 | 30 | 112 |
| Gøtudalstunnilin | 346 | 457 | 40 | 640 |
| Vegur um Skálafjørð | 60 | 79 | 30 | 103 |
| Tunnil til Gjáar | 85 | 112 | 40 | 157 |
| Tunnil til Tjørnuvíkar | 200 | 264 | 40 | 370 |
| Tunnil Leynar-Vestmanna | - | 700 | 40 | 980 |
| Uttari ringvegur í Tórshavn* | - | 110 | - | 110 |
| Tunnil um Sandavágsháls | 385 | 508 | 40 | 711 |
| Suðuroyartunnil** | - | 3.830 | 50 | 5.744 |
| Sandvíkartunnil | 219 | 289 | 40 | 405 |
| Umfararvegur í Hvalba | 61 | 81 | 30 | 105 |
| Fjøruvegurin í Runavík* | - | 55 | - | 55 |
| Selatraðarvegurin | 63 | 83 | 30 | 108 |
| Sandarlíð | 39 | 52 | 30 | 68 |
| Dagføringar á Strondum | 21 | 28 | 30 | 36 |
| Dagføringar av tunlum | 75 | 99 | 30 | 129 |
| Aðrar smærri verkætlanir | - | 200 | 30 | 260 |
| | | | | |
| **Kostnaðarmeting 2022Q4 íroknað váðaískoyti (mió. kr.)** | | | | **um 10.200** |

Kelda: Landsverk og metingar hjá Fíggjarmálaráðnum.
* Kommunalar verkætlanir, sum landið veitir stuðul til. (avtalað stuðulsupphædd)
** Kostnaðarmeting er ikki íroknað avleiddu verkætlanirnar í Sandvík og Hvalba.

Hesar verkætlanirnar í samferðsluætlanini hjá Landsverki eru ikki tiknar við í talvu A1 (grundgevingar í klombur):

- Rennistrongur til Svínoyar (ivasamt um hann verður til veruleika, lagt er upp fyri nýggjum skipi)
- Flogvøllur á Glyvursnesi (ivasamt um hann verður til veruleika)
- Tunlar Norður um Fjall (verkætlan í gerð og komin væl áleiðis í 2024)
- Dalstunnilin (verkætlan í gerð og komin væl áleiðis í 2024)
- Fámjinstunnilin (verkætlan í gerð og komin væl áleiðis í 2024)

Viðvíkjandi hesum verkætlanunum eru nýggjar kostnaðarmetingar tøkar, og tí er ongin eldri kostnaðarmeting í talvuni omanfyri:

- Tunnil Leynar-Vestmanna
- Suðuroyartunnilin
- Uttari ringvegur í Tórshavn
- Fjøruvegurin í Runavík

**Viðlíkahaldstørvur (eftirsleipið)**
Stórur tørvur er á viðlíkahaldi av ymiskum almennum ognum. Nevnast kunnu vegir, tunlar, brýr, bygningar, KT-skipanir og dagføringar av Smyrli.

Roknast kann við, at neyðugt er at brúka 3-10% av útveganarkostnaðinum árliga uppá viðlíkahald, alt eftir slagnum á íløgu. Serstakliga innan vegir, tunlar (ikki undirsjóvartunlar), brýr og bygningar hevur verið játtað alt ov lítið til víðlíkahald í fleiri áratíggju. Hetta hevur havt við sær, at tørvur er á viðlíkahaldi, sum er nógv størri enn vanligi árligi tørvurin á viðlíkahaldi. Hetta verður ofta eisini nevnt *eftirsleipið* innan viðlíkahald. Talva A2 niðanfyri lýsir viðlíkahaldstørvin hjá landinum og býtt á tey ymisku høvuðsøkini:

| *Talva A2 : Viðlíkahaldstørvur (eftirsleipið)* | *Kostnaðarmeting 2018 (mió. kr.)* | *Kostnaðarmeting 2022Q4 (mió. kr.)* |
|---|---|---|
| Vegir, tunlar og brýr [] | 375 | 469 |
| Bygningar landsins | 470 | 559 |
| Dagføringar av verandi KT-skipanum* [] | - | 400 |
| Dagføringar av M/F Smyrli** [] | - | 150 |
| | | |
| **Mettur viðlíkahaldstørvur tilsamans (mió. kr.)** | | **um 1.600** |

Kelda: Landsverk og metingar hjá Fíggjarmálaráðnum.
Viðm.: Kostnaðarmetingarnar fyri viðlíkahald av vegum, tunlum og brúm og landsins bygningum eru dagførdar samsvarandi norska *Kostnadsindeks for drift og vedlikehold av veger* og danska *Byggeomkostningsindeks for boliger* frá 2018Q4 til 2022Q4. Landsverk mælir til, at játtanin til viðlíkahald av vegum verður hækkað við um 70 mió. kr. árliga.
* Skatta-, avgjalds-, og stuðulskipanir, Talgilda Heilsuskipanin THS, Búskaparskipanir landsins BSL.
** Roknað verður við, at smærru skipini hjá SSL kunnu viðlíkahaldast við rakstrarjáttanum næstu um 15 árini.

**Grøna orkuskiftið (el-framleiðsla, SEV)** []
Íløgurnar í grøna orkuskiftið innan el-framleiðsluna kunnu metast til *í minsta lagi einar 4 mia. kr.* næstu um 15 árini. Tær íløgurnar verða gjørdar av SEV og verða rindaðar aftur av brúkaranum. Við í kostnaðarmetingina er pumpuskipan fyri um 1,4 mia. kr., íløgur í netið fyri um 1,6 mia. kr. og vindmyllulundir fyri um eina mia. kr.

SEV er eitt alment/kommunalt felag við høgum solvensi og lítlari skuld. Verða íløgurnar og útbyggingarnar gjørdar rætt og skilagott og so hvørt, sum fíggjarliga støðan hjá SEV loyvir tí, nýtast íløgurnar og lántøkan ikki at skala lánførið hjá landinum stórvegis.

Neyðugt er kortini at nevna, at landið í síðsta enda og óbeinleiðis veðheldur fyri alla skuldina hjá SEV. Landið kann ikki lata SEV fara á húsagang og kann heldur ikki liva við, at el-framleiðslan steðgar í Føroyum.

**Útbygging av sjúkrahúsverkinum** []
Roknast kann við, at neyðugt verður at gera íløgur í víðarimenning av sjúkrahúsverkinum fyri *í minsta lagið um eina mia. kr.* næstu um 15 árini. Hetta er kostnaðarmeting frá 2021, og aftaná at nýggi H-bygningurin er liðugur og tikin í nýtslu. Lagt er ikki upp fyri, at neyðugt verður helst eisini at byggja ella útvega nýtt sjúklingahotell í Danmark. Hesum íløgunum kemur landið at standa fyri, og íløgurnar koma at síggjast beinleiðis á íløguætlanini hjá landinum.

**Tørvurin á vardum bústøðum**
Almannaverkið hevur tørv á um 350 vardum bústøðum aftrat næstu 10 árini. Kostnaðarmeting frá 2021 er *um 500 mió. kr.* Kostnaðarmetingin er ikki dagførd til 2023.

Íløgurnar eru lutvíst brúkarafíggjaðar, men landið kemur at standa fyri teimum, og útveganarkostnaðurin kemur at síggjast beinleiðis á íløguætlanini hjá landinum og koma at ávirka skuldina hjá landinum.

**Endurnýggjan av ferjunum hjá SSL** []
Endurnýggjan av ferjunum hjá SSL er mett at kosta *í minsta lagi um 400 mió. kr.* Tá eru hesar ferjur tiknar við í metingina:

- M/F Sam (Klaksvík – Syðradalur), bygdur í 1975
- M/F Ritan (Hvannasund – Svínoy/Fugloy), bygd í 1971
- M/F Sildberin (Sandur – Skúvoy), bygd í 1994
- M/F Ternan (Tórshavn – Nólsoy), bygd í 1980
- Nýggj ferja til Hestleiðina

Sum sæst omanfyri, er nýtt ella annað skip til Suðuroyarleiðina ikki tikið við í metingina. Í staðin er tunnil til Suðuroynna við í kostnaðarmetingini í sambandi við samferðsluætlanina omanfyri.

Tær íløgurnar kemur landið at standa fyri, og íløgurnar koma at síggjast beinleiðis á íløguætlanini hjá landinum.

**Ymiskar aðrar íløguverkætlanir**
Niðanfyri eru nevndar ymiskar aðrar íløguverkætlanir, sum roknast kann við vera neyðugar at fara undir næstu 15 árini.

*Talgilding av almennum tænastum* []
Roknast kann við, at íløgur skulu gerast fyri *í minsta lagi um 300 mió. kr.* í talgilding av ymiskum almennum tænastum og skipanum.

*Grøn umlegging av verandi almennum bygningum* []
Roknast kann við, at íløgur skulu gerast fyri *í minsta lagi um 100 mió. kr.* í grøna umlegging av verandi almennum bygningum.

*Nýtt vaktar- og bjargingarskip* []
Roknast kann við, at neyðugt verður at byggja ella útvega nýtt vaktar- og bjargingarskip fyri (ella aftrat) Tjaldrið, sum varð bygt í 1976. Eitt tílíkt skip er mett at kosta *í minsta lagi 400 mió. kr.*

*Útbygging og dagføring av Vága Floghavn* []
Roknast kann við, at neyðugt verður at útbyggja og dagføra bæði flogbreytina og farstøðina í Vága Floghavn. Roknast kann við, at íløgurnar tilsamans vera *í minsta lagi um 500 mió. kr.* í bæði farstøðina og í flogbreytina. Hesar íløgurnar vera væntandi lutvíst brúkarafíggjaðar við inntøkum hjá P/F Vága Floghavn, men brúkarafíggingin fer neyvan at fíggja alla íløguna.

*Eldraíbúðir* []
Neyðugt verður at byggja eldraíbúðir til vaksandi talið av eldri borgarum næstu árini. Borgarar omanfyri 80 ár vera 50% fleiri næstu 10 árini. Um til dømis 20% av borgarunum omanfyri 80 ár um 10 ár hava tørv á eldraíbúð, er talan um 800 íbúðir (20% av 4.000). Íløgan kann metast til *um*

*eina mia. kr.* Eldraøkið verður umsitið av kommununum, og tí kann roknast við, at kommunurnar lutvíst fara at standa fyri hesum íløgunum. Tað ikki óhugsandi, at íløgurnar kunnu fíggjast av landi og kommunum. Roknast kann við, at íløgurnar lutvíst vera brúkarafíggjaðar.

*Tjóðleikhús*
Ætlanir eru um at byggja eitt Tjóðleikhús í Tórshavn á um 5.000 fermetrar. Roknast kann við, at ein tílíkur bygningur fer at kosta *í minsta lagi um 300 mió. kr.*

*Universitetskampus* [🕮]
Ætlanir eru um at byggja universitetskampus í Tórshavn. Verkætlanin er enn á byrjanarstigi. Ein forkanning frá desember 2018 vísti, at roknast kann við einari íløgu á um eina mia. kr. Kostnaðarmetingin kann dagførast til um 1,2 mia. kr. í 2023.

*Íløgur í talgilda undirstøðukervið (5G net, fipurbreiðband, nýggjur sjókaðal)* [🚇][💻]
Føroya Tele samtakið hevur ætlanir um at gera stórar íløgur í talgilda undirstøðukervið í Føroyum. Endamálið er at framtíðartryggja talgilda undirstøðukervið í Føroyum næstu nógvu árini. Íløgurnar eru neyðugar, skulu Føroyar ikki vera eftirbátur millum framkomin lond, tá ið umræður talgilda undirstøðukervið.

Íløgurnar fevna um nýggja 5G-farnetið, fipurbreiðband og nýggjan sjókaðal úr Føroyum til útheimin. Íløgurnar í 5G-netið eru í stóran mun rindaðar og settar í verk, men tað er ikki óhugsandi, at nakrar avleiddar íløgur eru eftir at gera í 5G tøknina fyri at fáa fulla nyttu. Kostnaðurin av at leggja fipurbreiðband til flest øll húsarhald og aðrar bygningar í Føroyum kann leysliga metast til 4-500 mió. kr.

Í dag eru sjókaðalarnir SHEFA-2 og FARICE-1 grundarlagið undir tí týðandi sambandi, sum knýtir Føroyar til útheimin, og hóast regluleikin sum heild hevur verið høgur á samlaða sambandinum, hava útfall verið á einstøku skipanunum, sum hava vart í minuttir og upp í nógvar dagar. Tó hevur redundant tøkni gjørt, at ávirkanin á Føroya land og føroyingin hevur verið lítil. Við tí stóra týdningi, sum uttanlandssambandið hevur, er alneyðugt, at sambandið ikki verður óvirkið orsakað av brekum á øllum kaðalskipanum samstundis.

Ein triði sjókaðal hevði bøtt munandi um trygdina á sambandinum. Ein yvirskipað meting av kostnaðinum at leggja nýggjan sjókaðal millum Føroyar og eitt av grannalondunum, er nærum 500 mió. kr.

Íløgurnar tilsamans í fipurbreiðband, nýggjan sjókaðal og nýggju 5G tøknina kunnu leysliga metast til *um 1 mia. kr.* Tær íløgurnar verða gjørdar av FT samtakinum og verða rindaðar aftur av brúkaranum. FT Samtakið er eitt alment samtak/felag við høgum solvensi og lítlari skuld. Verða íløgurnar og útbyggingarnar gjørdar rætt og skilagott og so hvørt, sum fíggjarliga støðan hjá FT Samtakinum loyvir tí, nýtast íløgurnar og lántøkan ikki at skala lánførið hjá landinum stórvegis.

Neyðugt er kortini at nevna, at landið í síðsta enda og óbeinleiðis veðheldur fyri alla skuldina hjá FT Samtakinum. Landið er einasti eigari av samtakinum og kann ikki lata FT Samtakið fara á húsagang og hevði heldur ikki kunnað livað við, at talgilda undirstøðukervið (fartelefon- ella breiðbandsnet) ikki virkaðu í Føroyum.

*Bygging av almennum leigubústøðum (Bústaðir)*
Ætlanir eru um, at Bústaðir næstu árini skulu byggja fleiri almennar leigubústaðir. Bygging fyri *um 500 mió. kr.* hevur verið nevnd nakrar ferðir. Kostnaðarmetingin er ikki dagførd til 2023. Skipaði leigumarknaðurin í Føroyum er eini 15 ára gamal, og endamálið við byggingini er at nøkta ein part av stóra tørvinum á leigubústøðum.

Íløgurnar í leigubústaðir eru brúkarafíggjaðar og kunnu væntandi gerast uttan at tær ávirka lánførið hjá landinum stórvegis.

*Dagføring av undirsjóvartunlum* []
Landsverk hevur kunnað politiska myndugleikan um, at neyðugt verður at dagføra Vága- og Norðoyatunlarnar fyri eina upphædd á *um 300 mió. kr.* næstu um 10 árini. Kostnaðinum kemur av neyðugum endurnýggjanum í tunlunum av tekniska útbúnaðinum. Talan er um pumpustøðir, ljós, eldávaring, viftur, neyðtelefonir, radioútgerð, radara- og teljiútgerð, og stýringar av ljósi og pumpum. Íløgurnar verða rindaðar við tunnilsgjøldunum og eru brúkarafíggjaðar.

*Útbyggingar av fjarhitanetinum* []
Ætlanir eru um at byggja út fjarhitanetið í Tórshavn. Enn er torført gera neyvar kostnaðarmetingar av útbyggingunum, tí tøknin og framstigini í tøknini verða avgerandi fyri, hvørjar útbyggingar verða gjørdar. Útbyggingar kunnu kortini væntast at kosta *í minsta lagi um 500 mió. kr.* Íløgurnar eru brúkarafíggjaðar og fara væntandi ikki at ávirka lánførið hjá landinum.

*Nýggj brennistøð (-støðir)* [][]
Brennistøðirnar hjá Tórshavnar Kommunu og hjá IRF eru báðar vorðnar ov smáar til tað burturkast, sum støðirnar taka ímóti, og støðirnar eru frá 1987 (KOB) og 1989 (IRF). Tørvur verður tí í næstum á at byggja eina ella tvær nýggjar brennistøðir. Mett verður, at til ber at byggja eina brennistøð fyri *5-600 mió. kr.*, sum hevði kunnað verið brennistøð fyri allar Føroyar. Talan er um eina kommunala íløgu, sum rúm helst verður fyri í samlaða kommunala íløgukarminum fyri næstu 15 árini. Hendan íløgan er tí íroknað í kommunala løgukarminum í talvu A3.

*Bygningar innan savnsøkið*
Hetta fevnir um bygningar hjá Tjóðsavninum, Landsskjalasavninum, Koltursverkætlanini, Hvalastøðini við Áir umframt fornfrøðiligar bakkaverjur. Torført er at gera kostnaðarmeting, men ein varislig meting er *um 100 mió. kr. tilsamans*.

*Stuðulsveitingar til bygging*
Hetta fevnir um stuðulsveitingar til ymiska bygging. Til dømis eru Fíggjarmálaráðnum kunnugt tvær nýggjar kirkjur ávegis (Argir og Glyvrar). Harafturat kunnu nevnast Føroya Arena, fótbóltshallir, ÍSF-hús, Sjósavnið, mentanarhús, eftirskúlar, háskúlar við meira. Torført er at gera neyvar kostnaðarmetingar, men ein varislig meting er *um 100 mió. kr. tilsamans*.

**Samanteljing av íløgutørvinum næstu um 15 árini**
Í talvu A3 niðanfyri verða íløgurnar, sum eru nevndar í uppritinum, taldar saman. Talvan vísir, at íløgutørvurin hjá landinum næstu um 15 árini kann metast til um 16,9 mia. kr., tá ið umræður íløgur, sum verða gjørdar beinleiðis av landinum. Harafturat koma um 6,3 mia. kr. av íløgum, sum væntandi verða gjørdar av almennum feløgum, sum væntandi kunnu fara undir íløgurnar, uttan at tær nýtast at ávirka skuldina ella lánførið hjá landinum. Hesar íløgurnar eru brúkarafíggjaðar íløgur.

Løgutørvurin hjá landinum á um 16,9 mia. kr. næstu um 15 árini svarar til um 65-70% av BTÚ. Harafturat koma væntaðu íløgurnar hjá kommununum á til dømis 9 mia. kr. og í almennum partafeløgum á um 6,3 mia. kr., sum er um 60% av BTÚ.

Í uppritinum er bara leysliga mett um kommunala íløgutørvin næstu um 15 árini. Harafturat er ikki lagt upp fyri øðrum stórum verkætlanum, sum óvæntað kunnu koma uppá tal, og sum vit ikki vita um enn, og sum tí ikki eru við í uppritinum.

Helst er á einari leið at rokna við um 9 mia. kr. í kommunalum íløgum næstu um 15 árini. Til dømis hava kommunalu íløgurnar síðstu 10 árini (frá 2013 til og við 2022) verið um 6 mia. kr. Hetta er lýst í talvuni niðanfyri. Kommunurnar gera serliga íløgur í nýggjar dagstovnar, skúlar, ellis- og røktarheim, havnaútbyggingar, útstykkingar og ítrótta- og frítíðarannlegg. Kommunurnar fáa í næstum eisini tørv á at byggja nýggja brennistøð (-støðir). Sæð í mun til hetta, er helst ikki ov nógv at rokna við um 9 mia. kr. í kommunalum íløgum næstu um 15 árini.

| *Talva A3 : Samanteljing* | *Kostnaðarmeting (mió. kr.)* |
|---|---:|
| Samferðsluætlanin [] | 10.200 |
| Útbygging av sjúkrahúsverkinum [] | 1.000 |
| Tørvurin á vardum bústøðum (lutvíst brúkarafíggjað)* | 250 |
| Endurnýggjan av ferjunum hjá SSL [] | 400 |
| Talgilding av almennum tænastum [] | 300 |
| Grøn umlegging av verandi almennum bygningum [] | 100 |
| Nýtt vaktar- og bjargingarskip [] | 400 |
| Útbygging og dagføring av Vága Floghavn (lutvíst brúkarafíggjað) [] | 500 |
| Viðlíkahaldstørvur (vegir, tunlar, brýr, bygningar, skip og KT-skipanir) [][] | 1.600 |
| Eldraíbúðir (lutvíst kommunal og lutvíst brúkarafíggjað) []** | 500 |
| Tjóðleikhús (lutvís grunnafígging) *** | 200 |
| Universitetskampus [] | 1.200 |
| Bygningar innan savnsøkið | 100 |
| Stuðulsveitingar til bygging | 100 |
| **Tilsamans (mió. kr.)** | **um 16.900** |
| | |
| **Íløgur sum ikki nýtast at ávirka lánførið hjá landinum (brúkarafíggjað)** | |
| Grøna orkuskiftið (el-framleiðsla, SEV) [] | 4.000 |
| Íløgur í talgilda undirstøðukervið (5G net, fipur, nýggjur sjókaðal) [][] | 1.000 |
| Bygging av almennum leigubústøðum (Bústaðir) | 500 |
| Dagføringar av undirsjóvartunlum [] | 300 |
| Útbyggingar av fjarhitanetinum [] | 500 |
| **Tilsamans (mió. kr.)** | **um 6.300** |
| | |
| **Leysliga mettur kommunalur íløgutørvur (mió. kr.)** | **um 9.000** |
| | |
| **Mett BTÚ í 2023 (mió. kr.)** | **um 26.000** |
| | |
| **Mettur almennur íløgutørvur í % av BTÚ í 2023** | **125-130%** |

Viðm.: Tølini eru avrundað.
* Mett verður, at bygdir verða vardir bústaðir fyri 500 mió. kr. og at helvtin er brúkarafíggjað.
** Mett verður, at bygdir verða eldraíbúðir fyri 1.000 mió. kr. og at helvtin er brúkarafíggjað.
*** Tjóðleikhúsið er mett at kosta í minsta lagi um 300 mió. kr., og landsins partur er leysliga mettur til tveir triðingar.
Kelda: Landsverk og metingar hjá Fíggjarmálaráðnum.

Um landið fór undir allar íløguverkætlanirnar í hesum uppritinum yvir eitt tíðarskeið á um 15 ár, hevði hetta svarað til íløgur fyri um eina mia. kr. árliga. Síðstu árini hevur landið gjørt íløgur fyri um hálva mia. kr. árliga. Roknast kann við, at tað verður torført hjá landinum at brúka fyri meira enn 550-600 mió. kr. árliga til íløgur, tí avmarkað byggiorka er í landinum.

Verður lagt til grund, at landið frameftir fer at gera íløgur fyri um 550 mió. kr. árliga, kunnu næstu 15 árini eini 8-9 mia. kr. av íløgunum hjá landinum fíggjast á árliga íløgukarminum uttan at taka lán til íløgurnar. Samanteljingin í talvu A3 vísir, at neyðugt er við árligum karmi til íløgur á um 1,2 mia. kr. árliga næstu 15 árini, skulu allar verkætlanirnar fremjast. Tí verður neyðugt at raðfesta millum tær ymisku almennu íløgurnar næstu um 15 árini, tí fíggjarligt rásarúm verður ikki at fara undir allar íløguverkætlanirnar uttan at hækka skuldina hjá landskassanum munandi, og heldur ikki er byggiorka tøk til so nógv alment íløguvirksemi.

Fíggjarmálaráðið mælir tí til, at arbeitt verður við einari langtíðar íløguætlan fyri tað almenna, og at politisk støða verður tikin til almennu íløguverkætlanirnar, sum liggja fyri framman og sum ætlanin er at fara undir. Arbeiðið eigur millum annað at fevna um at raðfesta millum tær ymisku almennu íløguverkætlanirnar og at leggja eina ætlan fyri fíggingina av teimum.

Eitt gott amboð at meta um kostnaðin og nyttuna á ymiskum almennum íløgum eru sonevndar *kostnyttu-greiningar*, sum serliga kunnu nýtast til greiningar av íløgum í undirstøðukervið.